# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 5. mars 2019
Mál nr.: 19/00056
Málsviðgjørt: SPS
Eftirkannað: 27. februar 2019

**Løgtingsmál nr. 147/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde og í løgtingslóg um tryggingarvirksemi (**Skráseting av veruligum eigarum o.a.)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde og í løgtingslóg um tryggingarvirksemi**
(Skráseting av veruligum eigarum o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 5, nr. 9, verður “, sbr. § 58” broytt til: “, sbr. §§ 58 og 58 a”.

**2.** Í § 5 verður sum nr. 30 sett:
“30) Veruligur eigari: Ein fysiskur persónur, sum í síðsta enda beinleiðis ella óbeinleiðis eigur ella hevur ræði á nóg stórum parti av eigarapørtunum ella atkvøðurættindunum, ella sum á annan hátt hevur ræði, undantikið eigarar í feløgum, hvørs eigarapartar eru upptiknir til handils á einum regluleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum er álagdur upplýsingarskyldu samsvarandi ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum.”

**3.** Í § 18, stk. 1, 1. pkt., verður “navn og bústað stovnaranna og upplýsingar um navn, starv, og bústað hjá limunum í leiðsluni” broytt til: “navn og bústað hjá persónum, skrásettir við heimild í hesi løgtingslóg”.

**4.** Aftan á § 58, men áðrenn yvirskriftina yvir § 59, verður sett:

“**§ 58 a.** Felagið skal savna upplýsingar um veruligu eigarar felagsins, undir

hesum rættindi hjá teimum veruligu eigarunum. Eru eingir veruligur eigarar, ella kunnu eingir veruligir eigarar eyðmerkjast, skulu skrásettu limirnir í stjórn felagsins, sbr. § 10, stk. 1, skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya sum veruligir eigarar.
*Stk. 2.* Felagið skal skjótast gjørligt, eftir at felagið er kunnugt við, at ein persónur er blivin veruligur eigari, og eftir eina og hvørja broyting av teimum upplýsingum, sum eru skrásettar, skráseta upplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya. Felagið skal goyma upplýsingarnar um veruligu eigarar tess í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat. Felagið skal harumframt goyma upplýsingar um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.
*Stk. 3.* Felagið skal eftir áheitan lata upplýsingar til Føroya Landfúta um veruligu eigarar felagsins, undir hesum royndir at eyðmerkja veruligu eigarar tess. Felagið skal harumframt eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av eftirlits- ella umsjónaruppgávum teirra.
*Stk. 4.* Stk. 1-3 verða ikki nýtt upp á feløg, hvørs eigarapartar verða handlaðir á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum er álagdur upplýsingarskyldu samsvarandi ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skráseting og kunngering av upplýsingum eftir stk. 1 og 2 í kt-skipan Skráseting Føroya, undir hesum hvørjar upplýsingar skulu skrásetast í kt-skipanini.”

**5.** Í § 319, stk. 1, 1. pkt. verður “§§ 58-61,” broytt til: “§ 58, § 58 a, stk. 2 og 3, §§ 59-61,”.

**6.** Í § 319, stk. 4 verður aftan á “§ 57,” sett: “§ 57 a, stk. 6, § 58 a, stk. 5,”.

**§ 2**

Í anordning nr. 1114 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009. løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 25 frá 16. mars 2012 og løgtingslóg nr. 43 frá 6. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, stk. 3, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
“Undantikið reglurnar í kapitli 1, 2 og 7 og §§ 15 f-15 h, verður hendan lógin ikki nýtt upp á einstaklingafyritøkur, íognarfeløg og kommanditfeløg.”

**2.** Í § 15 d, stk. 1, 1. pkt. verður “navn, starv el. yrki og bústað leiðslunnar” broytt til: “navn og adressu hjá persónum, sum eru skrásettir sbrt. hesi lóg”.

**3.** Aftan á § 15 f, men áðrenn yvirskriftina yvir § 16, verður sett:

“**§ 15 g**. Ein fyritøka, sum er fevnd av hesi lóg, undantikið einstaklingafyritøkur, skal savna upplýsingar um fyritøkunnar veruligu eigarar, sbr. § 15 h, undir hesum rættindi hjá teimum veruligu eigarunum. Eru eingir veruligir eigarar, ella kunnu eingir veruligir eigarar eyðmerkjast, skulu skrásettu limirnir í dagligu leiðsluni hjá fyritøkuni skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya sum veruligir eigarar. Hevur fyritøkan ikki skyldu at skráseta leiðslu, sbr. § 11, stk. 1, skal tað skrásetast ein leiðsla, tá reglan í 2. pkt. skal verða nýtt.
*Stk. 2.* Fyritøkan skal skjótast gjørligt eftir, at fyritøkan er kunnug við, at ein

persónur er blivin veruligur eigari, og eftir eina og hvørja broyting av teimum upplýsingum, sum eru skrásettar, skráseta upplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya. Fyritøkan skal goyma upplýsingarnar um veruligu eigarar tess í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat. Fyritøkan skal harumframt goyma upplýsingar um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.
*Stk. 3.* Fyritøkan skal eftir áheitan lata upplýsingar til Føroya Landfúta um fyritøkunnar veruligu eigarar, undir hesum royndir at eyðmerkja veruligu eigarar tess. Fyritøkan skal harumframt eftir áheitan lata nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av eftirlits- ella umsjónaruppgávum teirra.
*Stk. 4.* Stk. 1-3 verða ikki nýtt upp á fyritøkur, hvørs eigarapartar verða handlaðir á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum er álagdur upplýsingarskyldu samsvarandi ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skráseting og kunngering av upplýsingum eftir stk. 1 og 2 í kt-skipan Skráseting Føroya, undir hesum hvørjar upplýsingar skulu skrásetast í kt-skipanini.

**§ 15 h.** Teir ella tann fysiski persónur verður mettur sum veruligur eigari, sum í síðsta enda beinleiðis ella óbeinleiðis eigur ella hevur ræði á nóg stórum parti av eigarapørtunum ella atkvøðurættindunum, ella sum á annan hátt hevur ræði, undantikið eigarar av fyritøkum, hvørs eigarapartar eru upptiknir til handils á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum er álagdur upplýsingarskyldu samsvarandi ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum.”

**4.** Í § 23. stk. 1, 1. pkt. verður aftan á “§ 15 c,” sett: “§ 15 g, stk. 2 og 3,”.

**§ 3**

Í anordning nr. 1113 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, sum sbroytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1 verður sum stk. 8 sett:
“*Stk. 8.* § 56 b um skráseting av veruligum eigarum verður nýtt upp á grunnar, sum fella uttan fyri øki lógarinnar eftir stk. 4, ella sum eru undantiknir lógini sbrt. stk. 5.”

**2.** § 56 a, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Upplýsingar um navn og adressu hjá persónum, skrásettir sbrt. hesi lóg, skulu til eina og hvørja tíð síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya uttan so, at Skráseting Føroya tekur aðra avgerð. Tað er galdandi bæði fyri virknar og strikaðar vinnurekandi grunnar.”

**3.** Aftan á § 56 a, men áðrenn yvirskriftina yvir § 57, verður sett:

“**§ 56 b.** Grunnurin skal savna upplýsingar um veruligu eigarar grunsins, sbr. § 56 c, undir hesum rættindi hjá teimum veruligu eigarunum.
*Stk. 2.* Grunnurin skal skjótast gjørligt, eftir at grunnurin er kunnugur við, at ein persónur er blivin veruligur eigari, og eftir eina og hvørja broyting av teimum upplýsingum, sum eru skrásettar, skráseta upplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya. Grunnurin skal goyma upplýsingarnar um veruligu eigarar í fimm ár eftir, at

veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat. Grunnurin skal harumframt goyma upplýsingar um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.
*Stk. 3.* Grunnurin skal eftir áheitan lata upplýsingar til Føroya Landfúta um veruligu eigarar felagsins, undir hesum royndir at eyðmerkja veruligu eigarar tess. Grunnurin skal harumframt eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av eftirlits- ella umsjónaruppgávum teirra.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skráseting og kunngering av upplýsingum eftir stk. 1 og 2 í kt-skipan Skráseting Føroya, undir hesum hvørjar upplýsingar skulu skrásetast í kt-skipanini.

**§ 56 c.** Teir ella tann verður mettur sum veruligur eigari av einum grunni, sum í síðsta enda beinleiðis ella óbeinleiðis hevur ræði á grunninum, ella sum á annan hátt hevur eigaralíknandi heimildir, undir hesum:
1) Nevnd grunsins, og
2) persónar, sum serliga fáa frá grunninum, ella um so er, at teir persónar, sum serliga fáa av útlutingum grunsins, enn ikki eru kunnugir fyri grunninum, tann bólkur av persónum, í hvørs høvuðsáhugamáli grunnurin er stovnaður ella virkar."

**4.** Í § 63. stk. 2 verður aftan á "§ 51" sett: ", § 56 b, stk. 2 og 3" .

**5.** Í § 63, stk. 3 verður "og § 43" broytt til: "§ 43 og § 56 b, stk. 2 og 3".

**6.** Í § 63 verður sum stk. 7 sett:
"*Stk. 7.* Tað kann verða álagt feløgum o.ø. løgfrøðiligum persónum revisábyrgd eftir kapitli 5 í revislógini."

**§ 4**

Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 137 frá 20. desember 2012, løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015 og løgtingslóg nr. 65 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 5, stk. 1 verður sum nr. 18 sett:
"18) **Veruligur eigari:** Ein fysiskur persónur, sum í síðsta enda beinleiðis ella óbeinleiðis eigur ella hevur ræði á nóg stórum parti av eigarapørtunum ella atkvøðurættindunum, ella sum á annan hátt hevur ræði."

**2.** Í § 17 verða sum stk. 3-6 sett:
"*Stk. 3.* Eitt sínámillum tryggingarfelag og ein tvørgangandi eftirlønargrunnur skal savna upplýsingar um veruligu eigararnar av sínámillum tryggingarfelagnum og tvørgangandi eftirlønargrunninum, undir hesum rættindi hjá teimum veruligu eigarunum. Eru eingir veruligur eigarar, ella kunnu eingir veruligir eigarar eyðmerkjast, skulu limirnir í stjórnini hjá sínámillum tryggingarfelagnum og tvørgangandi eftirlønargrunninum skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya sum veruligir eigarar.
*Stk. 4.* Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu skjótast gjørligt eftir, at sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin eru vorðin kunnug við, at ein persónur er blivin veruligur eigari, og eftir eina og hvørja broyting av teimum upplýsingum, sum eru skrásettar, skráseta upplýsingarnar eftir stk. 3 í kt-skipan Skráseting Føroya. Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu goyma upplýsingarnar um tess veruligu

eigarar í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat. Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu harumframt goyma upplýsingar um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.
*Stk. 5.* Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu eftir áheitan útflýggja upplýsingar til Føroya Landfúta um veruligu eigararnar av sínámillum tryggingarfelagnum og tvørgangandi eftirlønargrunninum, undir hesum um royndir hjá sínámillum tryggingarfelagnum og tvørgangandi eftirlønargrunninum at eyðmerkja tess veruligu eigarar. Sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu harumframt eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá ið hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av teirra eftirlitsuppgávum ella umsjónaruppgávum.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skráseting og kunngering av upplýsingum eftir stk. 3 og 4 í kt-skipan Skráseting Føroya, undir hesum hvørjar upplýsingar sínámillum tryggingarfelagið og tvørgangandi eftirlønargrunnurin skulu skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya."

**3.** Í § 215, stk. 2 verður aftan á "Brot á" sett: "§ 17, stk. 4 og 5,".

**§ 5**

Landsstýrismaðurin ásetur, nær løgtingslógin fær gildi. Undir hesum kann landsstýrismaðurin áseta skiftisskipanir.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Føroyar eru partur av altjóða samstarvinum innanfyri karmarnar av Financial Action Task Force (FATF), t.e. millumtjóða stovnur, sum hevur til endamáls at stríðast móti hvítvasking og fígging av yvirgangi.

FATF ger tilmæli, sum eru altjóða standardir um hóskandi tiltøk í sambandi við hvítvasking og fígging av yvirgangi, og sum tað er upp til londini at fremja við tiltøkum í stríðnum ímóti hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi.

Tilmælini innihalda m.a. tilmæli um, at tað verða tikin stig fyri at fyribyrgja, at feløg og líknandi løgfrøðiligir persónar verða misnýttir til hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi. Undir hesum verður mælt til, at tað skulu vera nøktandi, neyvar og dagførdar upplýsingar um veruligar eigarar, sum skulu vera atkomuligar hjá almennum myndugleikum og feløgum og persónum, sum eftir hvítvasklóggávuni eru fevnd av kravinum um at kenna kundan.

FATF ger fyri hvørt land sær eftirmeting av, í hvønn mun einstaka landið hevur framt tilmælini, og ger frágreiðingar um tað, sum eru alment atkomuligar. Viðmerkingar ella atfinnginar í hesum frágreiðingum kunnu skaða álitið og trúvirðið á m.a. fíggjarkervið í landinum.

Føroyar og Grønland verða eftirmettar í eftirmetingarfrágfreiðingini fyri Danmark. Í frágreiðingini 2017 varð viðmerkt, at Føroyar og Grønland hava avmarkaða lóggávu og skipanir fyri at fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangi, og viðmerkt varð, at ein skipað eftirmeting av Føroyum og Grønlandi varð ikki gjørd.

Í føroysku lóggávuni eru ongar reglur um veruligar eigarar, og m.a. fyri at fylgja FATF-tilmælunum og fyri at fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangi er tørvur á at seta reglur í vinnufelagalógirnar um veruligar eigarar.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Tað eru í dag ongar reglur um skráseting av veruligum eigarum, hvørki í partafeløgum ella øðrum løgfrøðiligum persónum. Tað skal hinvegin eftir § 58 í vinnufelagalógini vera ein almenn skrá yvir legalar eigarar, t.e. persónar og fyritøkur, sum hava atkvøðurættindi ella kapital í eini fyritøku. Hendan skrá, sum Skráseting Føroya skal umsita, og sum skal vera alment atkomulig, er bert galdandi fyri kapitalfeløg sum partafeløg, smápartafeløg, undir hesum íverksetarafeløg og partnarafeløg, t.e. kommanditfelag, har kommanditistarnir í felagnum hava skotið inn ein ávísan kapital, sum er býttur í partabrøv.

Í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme eru reglur um veruligar eigarar.

Samsvarandi reglur eru galdandi fyri tey øki (yvirtikin øki), m.a. tryggingarøki og grannskoðarar, eru ásettar í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi.

Bert fysiskir eigarar kunnu vera veruligir eigarar, meðan legalir eigarar bæði kunnu vera løgfrøðiligir og fysiskir persónar. Ein veruligur eigari kann ikki vera ein løgfrøðiligur persónur.

Eftir allýsingini í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme eru veruligir eigarar í vinnufelag ella í øðrum løgfrøðiligum persóni teir fysisku persónar, sum í síðasta enda eiga ella hava ræði á einum vinnufelag ella einum øðrum løgfrøðiligum persóni. Tað eru verulig eigaraviðurskifti, tá ein fysiskur persónum beinleiðis ella óbeinleiðis eigur ella hevur ræði á meira enn 25% av eigarapørtunum ella atkvøðurættinum í einum felag, undantikið í børsskrásettum feløgum. Tað kann eisini á annan hátt vera talan um verulig eigaraviðurskifti t.d. eftir avtalu, rætt at velja nevndarlimir ella líknandi.

Á ikki yvirtiknum økjum er ætlanin at seta nýggja lóg í gildi í staðin fyri galdandi. Samsvarandi er á yvirtiknum økjum ætlanin í staðin fyri galdandi lóg at gera nýggja lóg.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Hvítvasking av pengum, fígging av yvirgangi og skipað brotsverk verða í altjóða høpi mett at vera týðandi avbjóðingar, og sum eiga at verða loystar í altjóða samstarvi. Støðufesti og álitið á fíggjarligu skipanina sum heild kunnu vera fyri munandi skaða, orsakað av royndunum hjá lógbrótarum og persónum, sum viðvirka at dylja, hvar pengar frá lógarbrotum stava frá, ella royndunum at kanalisera lógligar ella ólógligar pengar til fígging av yvirgangi.

Fyri at fylgja FATF-tilmælunum og fyri at fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangi er endamálið við lógaruppskotinum at seta nýggjar reglur í vinnufelagalógirnar um veruligar eigarar.

Endamálið er eisini, at lóggávan á hesum økinum verður á sama støði sum í grannalondunum og hinum ES/EBS-londunum.

Nágreiniligar og dagførdar upplýsingar um veruligar eigarar eru av avgerandi týdningi fyri at forða royndunum hjá lógbrótarum og persónum, sum viðvirka, at dylja hvar pengar frá lógarbrotum stava frá, ella royndunum at kanalisera lógligar ella ólógligar pengar til fígging av yvirgangi.

Við lógaruppskotinum verður tryggjað, at feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir savna og goyma nøktandi, nágreiniligar og dagførdar upplýsingar um veruligu eigarar í feløgunum og løgfrøðiligu eindunum. Fyri at skapa størri gjøgnumskygni fyri at forða fyri misnýtslu av løgfrøðiligum eindum verður tryggjað, at upplýsingarnar verða skrásettar í eini miðsavnaðari skrá.

Endamálið er harumframt at styrkja tiltøkini móti skattaskjóli. Við sama endamáli er ætlanin at strika møguleika at geva út nýggj handahavapartabrøv í partafeløgum. Uppskot um tað, uppskot til løgtingslóg um vinnufelagalógini og vinnufyritøkulógini (striking av handhavapartabrøvum) verður lagt fyri Løgtingið samstundis, sum hetta uppskotið.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Skotið verður upp at seta nýggjar reglur um veruligar eigarar inn í vinnufelagalóggávuna. Nýggju ásetingarnar verða settar inn í hesar lógir:

Vinnufelagalógina, vinnufyritøkulógina (anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder), vinnugrunnalógina (anordning om ikrafttræden for

Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde) og í tryggingarlógina (løgtingslóg um tryggingarvirksemi).

ES/EBS-londini, undir hesum gannalondini, hava sett lóggávu í gildi fyri at fremja FATF-tilmælini. Í hesum londunum verða FATF-tilmælini framd innanfyri karmarnar av 4. hvítvaskfyriskipanina (Europaparlamentets og Rådets direktiv (EU) 2015/849 af 20. maj 2015 om forebyggende foranstaltninger mod anvendelse af det finansielle system til hvidvask af penge eller finansiering af terrorisme).

Hetta uppskotið er í samvari við lóggávuna í grannalondunum og við 4. hvítvasfyriskipanina.

Skotið verður upp, at tað verður álagt øllum vinnufyritøkum skylda at savna og goyma nøktandi, nágreiniligar og dagførdar upplýsingar um veruligu eigarar í fyritøkunum.

Fyritøkurnar skulu eftir áheitan lata upplýsingar til Føroya Landfúta um felagsins veruligu eigarar, undir hesum royndir at eyðmerkja tess veruligu eigarar. Fyritøkan skal harumframt eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt.

Upplýsingarnar skulu fyritøkurnar skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya, og skulu verða alment atkomuligar.

Skyldan verður áløgd øllum fyritøkum, annaðhvørt tær so eru partafeløg, smápartafeløg, onnur feløg, fevnd av vinnufyritøkulógini, einstaklinga fyritøkur undantiknar, grunnar, tryggingarfeløg, sínámillum tryggingarfeløg og tvørgangandi pensjónskassar.

Veruligir eigarar er nýtt hugtak í vinnufelagalóggávuni, og neyðugt er tí at áseta í lógunum eina allýsing av hesum hugatakinum, og verður tað í uppskotinum allýst soleiðis:
Ein fysiskur persónur, sum í síðsta enda beinleiðis ella óbeinleiðis eigur ella hevur ræði á nóg stórum parti av eigarapørtunum ella atkvøðurættindunum, ella sum á annan hátt hevur ræði.

Skotið verður upp, at ræði á 25% ella meira av kapitalinum ella atkvøðurættinum skal verða ein ábending um ræði.

Í grunnum er ikki nakar eksternur eigari - grunnurin eigur seg sjálvan. Veruligir eigarar í grunnum eru tí ikki teir, sum vanliga verða roknaðir sum eigarar, men verða allýstir sum teir ella tann, sum í síðsta enda beinleiðis ella óbeinleiðis hava ræði á grunninum ella sum á annan hátt hava eigaralíknandi heimildir, undir hesum nevnd grunsins og persónar, sum serliga fáa frá grunninum.

Tær nærri reglurnar um skráseting, undir hesum hvørjar upplýsingar skulu skrásetast, og hvør kann ella skal skráseta, verða ásettar í kunngerð, sum Skráseting Føroya ger.

Fyritøkur, sum hava eigarapartar, sum verða handlaðir á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum er álagdur upplýsingarskyldu samsvarandi ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum, verða eftir uppskotinum undantiknar kravinum um skráseting av veruligum eigarum. Orsøkin til tað er, at eigaraskarin í hesum feløgunum er nøktandi eyðmerktur sambært upplýsingarkrøvum í fíggjarligu lóggávuni.

Eftir uppskotinum verður møguligt at áleggja fevndu fyritøkunum revsing við bót fyri brot á skylduna at skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya upplýsingar um veruligar eigarar, ella á skylduna eftir áheitan at lata Føroya Landfúta ella øðrum almennum myndugleikum upplýsingarnar í sambandi við eftirlitsuppgávur.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá:
Tryggingareftirlitinum, Skráseting Føroya, Figgjarmálaráðnum, TAKS, Felagnum Føroyskir Peningastovnar, Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Felagnum Føroyskir Advokatar, Dátueftirlitinum.

Ummælissvar kom frá:
Tryggingareftirlitinum, Skráseting Føroya, Figgjarmálaráðnum, Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Føroya Arbeiðgevarafelag, Dátueftrirlitinum.

***Tryggingareftirlitið*** hevði lógartekniskar viðmerkingar, og er uppskotið rættað samsvarandi.

***Skráseting Føroya*** viðmerkir m.a., at uppskotið áleggur Skráseting Føroya fleiri uppgávur uttan at peningur fylgir við. "Raksturin hjá Skráseting Føroya er inntøkufíggjaður og tískil gerst tað avbjóðandi hjá Skrásetingini at røkja sínar uppgávur til fulnar. Ein partur av uppgávuni hjá Skráseting Føroya verður at hava eftirlit við (gera stakroyndir), at upplýsingar um veruligar eigarar eru rættar. Hetta kann gerast rættiliga arbeiðskrevjandi."

*Viðmerkingar:*

Uppskotið verður ikki sett í gildi, fyrr enn eigaraskráin er gjørd.

***Figgjarmálaráðið*** hevði ikki innihaldsligar viðmerkingar til uppskotið.

***Felagið Føroyskir Grannskoðarar*** viðmerktu m.a., at við uppskotinum verður lóggivið um nýggj skrásetingarkrøv, hóast Skráseting Føroya ikki hevur neyðugu kt-skipanina til at halda verandi krøv.

*Viðmerkingar:*

§ 58 í galdandi lóg er ikki sett í gildi, tí eigaraskráin ikki er gjørd. Heldur ikki ásetingarnar í hesum uppskotinum um skráseting av veruligum eigarum verða settar i gildi fyrr enn skráin er gjørd. Skráseting Føroya er við í grundardátuverkætlanini hjá Talgildu Føroyum. Ein liður í hesi verkætlan er at gera eina almenna virkisskrá yvir allar eindir í Føroyum (kann samanlíknast við CVR-registeret í Danmark). Í hesum sambandi verður eisini arbeitt við at gera eina eigaraskrá, har bæði løgligir (legalir) og veruligir eigarar skulu skrásetast.

***Føroya Arbeiðsgevarafelag*** hevði ikki ítøkiligar viðmerkingar til lógaruppskotið, og tók undir við uppskotinum, men vísti annars til viðmerkingarnar hjá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar.

***Dátueftirlitið***

Dátueftirlitið hevur ikki havt neyvari gjøgnumgongd av uppskotinum, men hevði nakrar spurningar um lógaruppskotið í mun til persónsupplýsingarlógina,

1) hvørjar persónsupplýsingar snýr tað seg um, ið verða at skráseta av Skráseting Føroya o.ø., og at lata Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og Int. Kriminalitet

2) um talan er um viðkvæmar upplýsingar,
3) um p- talið, og um
4) flutningur av persónsupplýsingum av landinum.

Viðmerkingar:

Til sp. nr. 1.

Upplýsingarnar, sum feløgini skulu savna og lata Skrásseting Føroya, og sum feløgini eftir áheitan skulu lata Føroya Landfúta og øðrum almenum myndugleikum eru upplýsingar sum eintýtt eyðmerkja viðkomandi persón, t.e. navn og bústað umframt rættindi í felagnum.

Feløgini skulu eftir áheitan lata upplýsingar Føroya Landfúta.

Harumframt skulu tey eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av eftirlitsuppgávum teirra.

Til sp. 2

Talan er ikki um viðkvæmar upplýsingar.

Upplýsingar um veruligar eigarar og royndir at eyðmerkja veruligar eigarar eru í byrjunarstøðu vanligir upplýsingar. Tann viðgerð av persónsupplýsingum, sum kann fara fram sbrt. lógaruppskotinum, kann tí fara fram innanfyri karmarnar av persónsupplysingarlógini, sbrt, tó fylgjandi:

Ásetingarnar í  uppskotinum samsvara við donsku LOV nr 262 af 16/03/2016 Lov om ændring af selskabsloven, lov om visse erhvervsdrivende virksomheder, lov om erhvervsdrivende fonde og forskellige andre love (Indførelse af register over reelle ejere)

Í viðmerkingunum til uppskotið ta lógina (2015/1 LF 94) varð um lógaruppskotið í mun til donsku peronsdataloven sagtVísast kann til viðmerkingarnar í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið) varð hetta viðmerkt um uppskotið í mun til donsku persondataloven.

“Datatilsynet har dog tilkendegivet, at det ikke kan udelukkes, at der kan være tilfælde, hvor en oplysning om forsøg på identifikation af reelle ejere vil have karakter af en oplysning om strafbare forhold, jf. persondatalovens § 8. Den indsamling, opbevaring og videregivelse af oplysninger, som selskaber, fonde og lignende foreslås at være forpligtede til at foretage efter lovforslaget, vurderes ikke i alle tilfælde at kunne ske inden for de rammer, som persondatalovens § 8 sætter for privates behandling af oplysninger om bl.a. strafbare forhold. Lovforslaget indebærer således på dette punkt en fravigelse af persondataloven.”

Til sp. nr. 3

Eftir § § 57 a, stk. 2 í vinnufelalógini um skráseting av smærri nøgd av handhavapartabrøvum kann p- talið verða skrásett í kt- skipan Skráseting Føroya.

Í 57 a, stk. 3 í lógini er ásett, at upplýsingar, sum eru skrásettar sbrt. stk. 1 og 3, kunnu einans latast víðari til aðrar almennar myndugleikar. Upplýsingar kunnu einans latast víðari, um upplýsingarnar eru neyðugar, fyri at almenni myndugleikin kann røkja sínar eftirlitsuppgávur, og um upplýsingarnar verða latnar í samsvari við løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Eftir uppskotinum ásetur landsstýrismaðurin Skráseting Føroya nærri reglur um skráseting og kunngering av upplýsingum eftir stk. 1 og 2 í kt- skipan Skráseting Føroya, undir hesum hvørjar upplýsingar skulu skrásetast í kt- skipanini. Verður í hesum ásetingunum reglur um skráseting av p- tali, skul hesar eisini vera í samsvari við § 57 a.

Til sp. nr. 4

Aftaná hoyringina er uppskotið broytt soleiðis, at Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og Int. Kriminalitet er broytt til Føroya Landfúta.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið um stovnan av skrá yvir veruligar eigarar hevur við sær, at kt-skipan Føroya skal tillagast. Harumframt verða útreiðslur til rakstur og eftirlit við upplýsingunum, sum verða skrásettir.

Ásetingarnar í uppskotinum verða tó ikki settar í gildi, fyrr enn skráin hjá Skráseting Føroya, har veruligu eigararnir skulu skrásetast, er gjørd. Skráseting Føroya er við í grundardátuverkætlanini hjá Talgildu Føroyum. Ein liður í hesi verkætlan er at gera eina almenna virkisskrá yvir allar eindir í Føroyum (kann samanlíknast við CVR-registeret í Danmark). Í hesum sambandi verður eisini arbeitt við at gera eina eigaraskrá, har bæði løgligir (legalir) og veruligir eigarar skulu skrásetast.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Ein partur av uppgávuni hjá Skráseting Føroya verður at hava eftirlit við (gera stakroyndir) at upplýsingar um veruligar eigarar eru rættar. Hetta setur størri krøv til umsitingina.

Uppskotið kann hinvegin hava við sær jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri landið við tað, at ein skrá yvir veruligar eigarar kann verða eitt amboð at fyribyrgja hvítvasking og onnur fíggjarlig brotsverk, m.a. skattaundandrátt.

Sbr. eisini viðmerkingarnar undir pkt. 2.1.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Hevur uppskotið jaligar ella neiligar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna, skal tað vera tilskilað.

Hevur lógaruppskotið ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna, skal tað vera tilskilað.
(Sí nr. 1.2.2.3. í rundskrivinum um lógarsmíð).

Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna, men hevur umsitingarligar avleiðingar.

Uppskotið hevur við sær skyldu hjá grannskoðaranum við tað, at hann skal ansa eftir, at skráseting av veruligum eigarum verður framd, og at neyðug skjalprógvan verður goymd um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar. Umsitingarligu avleiðingarnar eru avmarkaðar, tí tað

sambært allýsingini verður eitt avmarkað tal av persónsskrásetingum, og tí tað bert er skrásetingin, ikki um skrásetingin er røtt, sum grannskoðarin skal ansa eftir.

Skyldan hjá fyritøkunum at skráseta upplýsingar um veruligar eigarar hevur við sær umstingarligar kostnaðir við tað, at fyritøkurnar skulu fráboða upplýsingarnar til kt-skipan Skráseting Føroya.

Sbr. eisini viðmerkingarnar undir pkt. 2.1.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvi.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Við uppskotinum verður lóggávan betri í samsvari við FATF-tilmælini á økinum.

Føroyar eru partur av altjóða samstarvinum innanfyri karmarnar av Financial Action Task Force (FATF), t.e. millumtjóða stovnur, sum hevur til endamáls at stríðast móti hvítvasking og fígging av yvirgangi.

FATF ger tilmæli, sum eru altjóða standardir um hóskandi tiltøk í sambandi við hvítvasking og fígging av yvirgangi, og sum tað er upp til londini at fremja við tiltøkum í stríðnum ímóti hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi.

Tilmælini innihalda m.a. tilmæli um, at tað verða tikin stig fyri at fyribyrgja, at feløg og líknandi løgfrøðiligir persónar verða misnýttir til hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi. Undir hesum verður mælt til, at tað skulu vera nøktandi, neyvar og dagførdar upplýsingar um veruligar eigarar, sum skulu vera atkomuligar hjá almennum myndugleikum og feløgum og persónum, sum eftir hvítvasklóggávuni eru fevnd av kravinum um at kenna kundan.

FATF ger fyri hvørt land sær eftirmeting av, í hvønn mun einstaka landið hevur framt tilmælini, og ger frágreiðingar um tað, sum eru alment atkomuligar. Viðmerkingar ella atfinnginar í hesum frágreiðingum kunnu skaða álitið og trúvirðið á m.a. fíggjarkervið í landinum.

Føroyar og Grønland verða eftirmettar í eftirmetingarfrágfreiðingini fyri Danmark. Í frágreiðingini 2017 varð viðmerkt, at Føroyar og Grønland hava avmarkaða lóggávu og skipanir fyri at fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangi, og viðmerkt varð, at ein skipað eftirmeting av Føroyum og Grønlandi varð ikki gjørd.

Í føroysku lóggávuni eru ongar reglur um veruligar eigarar, og m.a. fyri at fylgja FATF-tilmælunum og fyri at fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangi er tørvur á at seta reglur í vinnufelagalógirnar um veruligar eigarar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Uppskotið hevur ikki týdning fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki í sær markarforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Víst verður til viðmerkingarnar undir pkt. 2.7.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki í sær reglur um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki í sær reglur um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Skotið verður upp, at tað verður áløgd øllum vinnufyritøkum skylda at savna og goyma nøktandi, nágreiniligar og dagførdar upplýsingar um veruligu eigarar í fyritøkunum. Fyritøkurnar skulu eftir áheitan lata upplýsingar til Føroya Landfúta um felagsins veruligu eigarar, undir hesum royndir at eyðmerkja tess veruligu eigarar. Fyritøkurnar skulu harumframt eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av eftirlitsuppgávum.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki atgongd til privata ogn**.**

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| avtalur og reglur | | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

***Til nr. 1*** *(Broyting av § 5, nr. 9)*
Í § 5, nr. 9 í galdandi lóg verður eigaraskrá allýst soleiðis: “Eigaraskrá: Tann skrá, sum Skráseting Føroya førir yvir kapitalpostarnar hjá ávísum kapitaleigarum, sbr. § 58.”

Skotið verður upp at broyta allýsingina av “Eigaraskrá”, so skráin, umframt at fevna um kapitalpostar hjá ávísum kapitaleigarum, eisini fer at fevna um veruligar eigarar, sum verður sett inn sum nýggj § 58 a í lógina við § 1, nr. 4 í lógaruppskotinum.

Eigaraskráin er samliheiti fyri skráseting av eigaraupplýsingum í vinnufeløgum, sum eru skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya. Eigaraskráin fevnir í dag um upplýsingar um eigarar við týðandi kapitalpostum, sum eru í minsta lagi 5 prosent av samlaða atkvøðurættinum ella felagskapitalinum í felagnum, sbr. § 58 í lógini.

Eftir uppskotinum fer eigaraskráin frameftir eisini at fevna um upplýsingar um veruligar eigarar, t.v.s. upplýsingar um fysiskar persónar, ið sambært allýsingini í § 1, nr. 2 í lógaruppskotinum eru mettir at vera veruligir eigarar, sbr. ásetingina í § 1, nr. 4. Hesar upplýsingarnar verða alment atkomuligar gjøgnum kt-skipan Skráseting Føroya.

Kt-skipan Skráseting Føroya inniheldur harumframt sbrt. § 57 a í vinnufelagalógini upplýsingar um eigarar við smærri nøgd av handhavapartabrøvum, har eigarin samlað hevur minni enn 5 prosent av vinnufelagsins samlaða atkvøðurætti ella felagskapitali. Hesar upplýsingar eru eisini eigaraupplýsingar, men eru tó ikki partur av allýsingini av eigaraskránni. Hetta tí talan er um eigaraupplýsingar, ið ikki eru alment atkomuligar, og sostatt bert kunnu latast víðari til nýtslu hjá øðrum almennum myndugleikum í sambandi við røkt av eftirlitsuppgávum.

Við uppskotinum til løgtingslóg um broyting í vinnufelagalógini og vinnufyritøkulógini (striking av handhavapartabrøvum), sum verður lagt fyri Løgtingið, samstundis við at hetta uppskotið verður lagt fyri tingið, verður tað frá 1. januar 2020 ikki longur møguligt at geva út nýggj handhavapartabrøv.

***Til nr. 2*** *(Nýtt nr. 30 í § 5)*
Skotið verður upp, at tað í § 5, nr. 30 verður sett inn í lógina allýsing av hugtakinum veruligur eigari. Allýsingin er neyðug við tað, at tað í lógaruppskotinum verða ásettar reglur um

skráseting av veruligum eigarum í m.a. kapitalfeløgum, sbr. uppskot til áseting í § 1, nr. 4 í uppskotinum.

Hugtakið veruligur eigari er ikki í vinnufelagalógini í dag, tí tann skráseting, sum verður gjørd sambært § 58, einans snýr seg um legalar eigarar. Hugtakið veruligur eigari skal tí ikki mistakast fyri hugtakið legalur eigari, sum kann fevna um ein størri skara av bæði fysiskum og løgfrøðiligum persónum.

Eyðkenni fyri legalan eigara er, at hesin fysiski ella løgfrøðiligi persónurin í byrjanarstøðu er beinleiðis eigari av kapitalpørtum í vinnufelagnum, og sum í byrjanarstøðu er tann, ið er skrásettur í eigarabók felagsins. Veruligi eigarin er hinvegin tann ella teir fysisku persónarnir, sum í síðsta enda eiga ella hava ræði á kapitalfelagnum, undir hesum møguliga gjøgnum eitt ella fleiri dótturfeløg. Eitt felag kann tí ikki skrásetast sum veruligur eigari, men tað kann skrásetast í skránna yvir legalar eigarar, tá treytirnar fyri tí eru loknar. Tað er ikki neyðugt at vera legalur eigari fyri at kunna verða mettur sum veruligur eigari, tá veruligur eigaraskapur kann íkoma gjøgnum óbeinleiðis eigaraskap ella ræði. Veruligi eigarin hevur eingi serlig rættindi ella heimildir mótvegis felagnum, uttan tað sum eigaraskapurin ella ræðið hevur við sær. Vanligu reglurnar um m.a. útinnan av eigararættindum gjøgnum aðalfund í einstaka felagnum verða sostatt framvegis nýttar.

Allýsingin av veruligum eigarum í uppskotinum samsvarar við allýsingina av veruligum eigarum í grein 3, stk. 6, litra a í 4. ES-direktivi.

Í dag er ein allýsing av veruligum eigarum í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme. Sama allýsing verður nýtt í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, sum vísir til allýsingina í anordninginum. Allýsingin í hvítvasklóggávuni er tó orðað eitt sindur øðrvísi enn tann, sum er skotin upp í hesum uppskotinum, tí tann í hvítvasklóggávuni er gjørd samsvarandi 3. hvítvaskdirektivi. Í praksis verða tær tvær allýsingarnar nærum samanfallandi, men tað verður munur viðvíkjandi prosentmarkinum fyri veruligum eigaraskapi við tað, at prosentmarkið er broytt í 4. hvítvaskdirektivi til bert at vera ein ábending (indikasjón) um veruligan eigaraskap ella ræði.

Arbeitt verður við at dagføra hvítvasklóggávuna.

Eftir grein 3, stk. 6, litra a í 4. hvítvaskfyriskipanini, sum inniheldur allýsingina av veruligum eigarum í vinnufeløgum, eru fysiskir persónar, sum í síðsta enda eiga ella hava ræði á einum nóg stórum parti av eigarapørtunum ella atkvøðunum, veruligir eigarar. Sambært § 3, stk. 6, litra a nr. i, annað brot, verður beinleiðis ella óbeinleiðis eigaraskapur ella ræði yvir meira enn 25% av einum løgfrøðiligum persóni mett at vera ábending um beinleiðis ella óbeinleiðis veruligan eigaraskap.

Skotið verður tí upp, at ein samsvarandi áseting verður sett inn í vinnufelagalógina, men uttan beinleiðis tilskilan av prosentmarki upp á 25%, sum bara er ein ábending um veruligan eigaraskap. Tað er tó eitt krav eftir uppskotinum, at talan skal vera um ein nóg stóran part av felagsins eigarapørtum ella atkvøðum, sum í viðmerkingunum verður nágreinað til 25%, sum við tí verður ein ábending um veruligan eigaraskap.

Harumframt framgongur av grein 3, stk. 6, litra a, nr. i, annar partur í 4. í hvítvaskfyriskipanini, at meginreglurnar í grein 22, stk. 1 í ES-fyriskipan 2013/34 um ársroknskapir og konsolideraðar

roknskapir fyri ávís sløg av vinnufyritøkum kunnu verða nýttar í metingini av, um tað beinleiðis ella óbeinleiðis er talan um ræði á einum løgfrøðiligum persóni.

Veruligir eigarar eru sostatt eftir uppskotinum tann ella teir fysisku persónar, sum í síðsta enda eiga ella hava ræði á einum felag, møguliga gjøgnum eitt ella fleiri dótturfeløg, ella sum á annan hátt hava ræði. Talan skal vera um nóg stóran part av kapitalinum ella atkvøðunum, tað vil í byrjanarstøðu siga meira enn 25 prosent. Ein veruligur eigari skal altíð vera ein fysiskur persónur, og í tí føri at talan er um eitt felag ella líknandi, eru tað tí teir aftanfyri standandi fysisku persónarnir, sum ásetingin fevnir um.

Ásetingin í uppskotinum hevur samband við kravið í galdandi hvítvaslóggávu um skylduna hjá fyritøkum, fevndar av hvítvasklóggávuni, at hava kunnleika til kundar hjá fyritøkuni, og, um kundin er ein fyritøka, at fáa greiðu á eigara- og ræðisviðurskiftunum hjá kundafyritøkuni, sbr. § 12, stk. 3 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme.

Allýsingin í lógaruppskotinum hevur eisini samband við FATF tilmælini, sbr. eisini í grein 30 í 4. hvítvaskfyriskipanini, um skyldu hjá løgfrøðiligum persónum at savna og goyma upplýsingar um veruligu eigararnar hjá løgfrøðiliga persóninum, og at hesar upplýsingar í minsta lagi skulu vera atkomuligar hjá myndugleikum og fyritøkum og persónum, fevndir av “kenn-tín-kunda-kravinum” í 4. hvítvaskfyriskipanini.

Eigaraskapur ella ræði kann vera beinleiðis ella óbeinleiðis, tað vil siga gjøgnum beinleiðis eigararæði á eigarapørtum í viðkomandi felag, fyritøku o.a., men eisini óbeinleiðis, t.v.s. gjøgnum holdingfelag, dótturfelag ella líknandi. Í uppgerðini av veruligum eigaraskapi verður hugt eftir møguligum løgfrøðiligum persónum, sum eru legalir eigarar soleiðis, at veruligu fysisku pesónarnir, sum í síðsta enda hava nóg stóran part av eigarapørtunum ella atkvøðunum, ella sum á annan hátt hava ræði, í uppgerðini eru teir viðkomandi persónar í mun til reglurnar um veruligar eigarar.

Í tí føri at ein løgfrøðiligur persónur eigur nóg stóran part av eigarapørtunum til at vera veruligur eigari, og um hesin persónur hevur avhendað atkvøðurættin til eigarapartarnar til annan fysiskan persón – møguliga gjøgnum ein ella fleiri løgfrøðiligar persónar – verða báðir fysisku persónarnir at meta sum veruligir eigarar.

Ásetingin fevnir um øll sløg av eigaraskapi ella ræði, sum m.a. hevur við sær, at krav er ikki um, at viðkomandi er eigari av eigarapartinum í felagnum, fyritøkuni v.m. Sostatt kann møguliga vera talan um ræði á annan hátt, sum t.d. gjøgnum avtalu, rætt til at velja nevndarlimir ella líknandi.

Um t.d. ein persónur hevur ræði á atkvøðurættindum, sum eru avhendað gjøgnum avtalu um veðseting, skal viðkomandi sostatt rokna hesi rættindi upp í uppgerðina av veruligum eigaraskapi. Tað er ein fortreyt, at man í roynd og veru hevur ræði á rættindunum, og at rættindini soleiðis ikki einans verða nýtt eftir boðum frá veðsetara.

Møgulig atkvøðurættindi, undir hesum tekningarrættur og keypsoptiónir til kapitalpartar, sum aktuelt kunnu verða nýtt ella konverterast, skulu takast við í metingini av veruligum eigaraskapi. Hetta tí at hetta slagið av rættindum kann gerast virkið við einsæris avgerð rættindahavaranna, sum tí sjálvur avger, nær viðkomandi vil ráða yvir kapitalpørtunum.

Verða tílík rættindi ikki tald við, kann tað nýtast til at fjala veruligan eigaraskap. Øvugt má tann, ið gevur út rættindini, neyðturviliga eisini rokna upp í ikki-brúkt rættindi, tá tann, ið gevur út rættindi - til rættindahavari aktiverar hesi - framhaldandi hevur ræði á kapitalpørtunum.

Ábyrgdin hjá fyritøkuni at telja hetta slag av óbeinleiðis eigaraskapi og ræði við í uppgerðina av, hvørt ein fysiskur persónur er veruligur eigari, fevnir bert um tað, sum fyritøkan visti ella átti at vitað. Tá veruligir eigarar eru teir fysisku persónarnir, sum í síðsta enda eru eigararnir av eigarapørtum ella atkvøðurættindunum, er tað eisini neyðugt hjá felagnum at savna upplýsingar um ein eigara, sum útinnur síni rættindi gjøgnum sokallaðan “nominee-ordning” í tann mun, ilgruni er um, at viðkomandi er veruligur eigari.

Rættur til at tilnevna ella at seta frá meirilutan av limunum í nevnd felagsins kann somuleiðis kunna hava við sær veruligan eigaraskap. Í tílíkum førum má tó vera eitt rættarkrav, grundað á viðtøkur felagsins, eigaraavtalu og avtalu í sambandi við veðseting av kapitalpørtum ella líknandi.

Í nøkrum førum kann tað eisini verða neyðugt at meta um veruliga talið av atkvøðum, umboðað á aðalfundinum. Um tað við støði í áður hildnum aðalfundum vísir seg, at einans 60 prosent av samlaðu atkvøðurættindunum í einum felag verða umboðað á aðalfundinum, skulu minni enn 25 prosent av atkvøðunum til, fyri at einstaki eigarin kann hava ræði sum veruligur eigari. Talan skal tó vera um meiri støðug viðurskifti. Sama aðalregla ger seg galdandi í sambandi við tilnevningarrættindi, har støðug frávera hjá nevndarlimum kann geva hinum nevnarlimunum lutfalsliga størri ávirkan. Sum dømi kann rætturin til at tilnevna ávíst tal av nevndarlimum geva størri ávirkan, um ein ella fleiri av hinum nevndarlimunum støðugt hava forfall frá nevndarfundunum.

Tað er samlaða de facto ávirkanin, sum ein fysiskur persónur fær gjøgnum beinleiðis ella óbeinleiðis eigararæði á partabrøvum, atkvøðurættindum ella annað slag av ræði, sum er avgerandi fyri, um viðkomandi kann verða mettur sum veruligur eigari. Tað fer altíð at verða staðfest út frá ítøkiligari meting. Krav verður ikki sett um avgerandi ávirkan, sum allýst í vinnufelagalógini.

Byrjanarstøðið fyri uppskotnu ásetingini um, at ein fysiskur persónur er veruligur eigari í einum felag, um viðkomandi eigur ella hevur ræði á meiri enn 25 prosentum av kapitalpørtunum ella atkvøðurættindunum í felagnum, víkir frá allýsingini í vinnufelagalógini um avgerandi ávirkan.

Sambært § 7 í vinnufelagalógini er tað sum meginregla í fyrsta lagi talan um avgerandi ávirkan, og sostatt ráðandi eigaraskap, tá viðkomandi hevur heimildina at stýra fíggjarligu og rakstrarligu avgerðunum, sum vanliga fæst við eigaraskapi ella ræði á meiri enn helvtini av atkvøðurættindunum í felagnum. Viðmerkjast skal, at sambært uppskotnu allýsingini kunnu tað vera fleiri fysiskir persónar, sum verða mettir sum veruligir eigarar. Hetta er ikki gjørligt eftir vinnufelagalógini í mun til løgfrøðiligar ella fysiskar persónar, sum hava avgerandi ávirkan. Tað er ikki avgerandi, at ein fysiskur persónur hevur avgerandi ávirkan í felagnum, tá hinir eigararnir framhaldandi kunna vera veruligir eigarar, um treytirnar fyri hesum eru uppfyltar/loknar.

Harafturat er umráðandi at vera varugur við, at allýsingin av hugtakinum veruligur eigari, ikki broytir ta grundleggjandi vinnufelagarættarligu aðalregluna um, at fyrisitingarlig og fíggjarlig rættindi einans kunnu útinnast við heimild í tí í eigarabókini skrásetta eigaraskapinum. Somuleiðis yvirtekur ein leiðsla í einum felagi, sum verður skrásett í kt-skipan Skráseting

Føroya, sum fylgja av, at tað ikki er ella kann eyðmerkjast nakar veruligur eigari í felagnum, heldur ikki av teirri grund serlig fyrisitingarlig ella fíggjarlig rættindi.

Um tað hjá eigara av einum felagi eru avmarkingar í atkvøðurættinum viðvíkjandi hansara eigaraparti, hevur hetta ikki týdning fyri, um viðkomandi persónur er veruligur eigari. Ein eigarapartur upp á t.d. 30 prosent av partabrøvunum í einum felagi hevur við sær, at viðkomandi persónur er veruligur eigari uttan mun til, um tað møguliga eru avmarkingar, so tað einans kann atkvøðast fyri 5 prosentum av samlaða atkøðurættinum. Samsvarandi ger seg galdandi, um tað gjøgnum eigaravtalu ella líknandi eru ásett vetorættindi, sum avmarka útinnanina av atkvøðurættindunum hjá viðkomandi. Grundgevingin fyri hesum er, at tað er viðkomandi at fáa kunnleika til bæði teir eigarar, sum eru veruligir eigarar í fíggjarligum høpi og teir eigarar, sum eru veruligir eigarar í fyrisitingarligum høpi. Hetta tí at bæði sløgini av veruligum eigarum eru týðandi í mun til at forða fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, tá hesi ítøkiliga kunnu ávirka felagið og fáa part í ognum felagsins.

Tað kann eftir eini ítøkiligari meting vera talan um veruligan eigaraskap gjøgnum vetorættindi, sum kann verða fatað sum “negativt ræði”. Hetta er tó treytað av, at tað samstundis er talan um eitt ella annað slag av eigaraskapi, tá vetorættindi í sjálvum sær ikki eru at meta sum veruligur eigaraskapur.

Sambært grein 3, stk. 6, litra a, nr. ii, í 4. hvítvaskfyrskipan skal dagliga leiðslan hjá løgfrøðiliga persóninum metast sum “veruligir eigarar” um tað aftaná neyðugar kanningar og treytað av, at illgruni ikki er um nakað revsivert, t.d. strámannavirksemi, verður lagt til grund, at eingir fysiskir persónar eru, ið koma undir allýsingina av veruligum eigara.

Verða eigarapartar hjá einum felagi handlaðir á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, hevur tann løgfrøðiligi persónurin sambært uppskotnu allýsingini ikki nakran veruligan eigara. Uppskotið er í samsvari við 4. hvítvaskfyriskipan, sbr. grein 3, stk. 6, litra a, nr. i í 4. Í hvítvaskfyriskipan, har feløg, sum eru skrásett á einum reguleraðum marknaði, og sum hava upplýsingarskyldu sambært ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum, ið tryggja hóskandi gjøgnumskygni í sambandi við upplýsing um eigaraskap, ikki eru umfatað av allýsingini í 4. hvítvaskfyriskipan um veruligan eigara.

Orsøkin er, at tað í mun til hesi feløg er hóskandi gjøgnumskygni í sambandi við upplýsingar um eigaraskap hjá feløgunum.

Skotið verður tí upp, at tað í allýsingini av veruligum eigarum verður sæð burtur frá eigarum í feløgum, hvørs eigarapartar verða handlaðir á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum hevur upplýsingarskyldu í samsvari við ES-rættin ella samsvarandi altjóða standardum.

Allýsingin hevur við sær, at øll feløg, hvørs eigarapartar verða handlaðir á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, ikki hava nakran veruligan eigara. Ein reguleraður marknaður finst bert innan fyri ES og lond, sum Samveldið hevur gjørt avtalu við á fíggjarliga økinum, t.d. EBS. Ein samsvarandi marknaður, sum hevur upplýsingarskyldu sambært ES-rættinum, kann vera ein sokallaður “multilateralur handilsfacilitetur”, har reglurnar um upplýsing av týðandi ognarræði eru settar í gildi fyri viðkomandi marknað.

Hetta fevnir t.d. um danska marknaðin First North, ið er ein sokallaður alternativur marknaður, sum er reguleraður sambært lóg um virðisbrævahandil v.m.

Harumframt fara feløg, hvørs eigarapartar verða handlaðir á einum marknaði uttanfyri ES ella lond, sum felagsskapurin ikki hevur gjørt avtalu við á fíggjarliga økinum, ikki at hava nakran veruligan eigara, um hesin marknaður er fevndur av altjóða standardum, sum eru í samsvari við ES-rættarkrøv viðvíkjandi upplýsingarskyldu.

Tá eigarapartarnir hjá einum felag eru upptiknir til handils á einum reguleraðum marknaði, er felagið fult og heilt bundið at ES-rættarligu upplýsingarskyldunum. Uttan mun til, um allir partabrævaflokkar ikki eru upptiknir til handils. Tað vil siga, at sjálvt um t.d. einans B-partabrøvini í felagnum – men ikki A-partabrøvini – eru skrásett, er tað fyri hesi feløg tað kravda gjøgnumskygnið í sambandi við upplýsingar um eigaraskap.

***Til nr.*** *3 (Broyting av § 18, stk. 1, 1. pkt.)*
Í § 18 í galdandi lóg er ásett, at upplýsingar um navn og bústað stovnaranna og upplýsingar um navn, starv, og bústað hjá limunum í leiðsluni, skulu, til eina og hvørja tíð síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya. Hetta er galdandi fyri bæði virkin og avtikin feløg.

Ásetingin í uppskotinum er framhald av innihaldinum í higartil galdandi áseting, men skotið verður upp at nágreina, at kravið um upplýsingar frameftir skal fevna um allar persónar, sum eru skrásettir í kt-skipan Skráseting Føroya. Ásetingin hevur áður bert fevnt um stovnara og limir í leiðsluni, men uppskotna ásetingin skal tryggja, at t.d. eisini eigarar – bæði legalir og veruligir – frameftir síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya. Í mun til eigarar, er dagføringin sostatt frameftir galdandi fyri eigarar, skrásettir sambært §§ 57 a, 58 og 58 a.

Fyrr var krav um, at starv hjá limunum í leiðsluni skuldi dagførast, men hetta krav verður ikki mett neyðugt at galda framhaldandi, tí hetta verður mett sum upplýsing, ið ikki verður brúkt longur, og tí ein óneyðug byrða fyri feløgini. Tað fer framhaldandi at síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya, hvørja funksjón einstaki persónurin hevur havt í felagnum.

***Til nr. 4*** *(Nýggj § 58 a)*
Ásetingin í uppskotinum er í samsvari við grein 30, stk. 1-6, og stk. 9 í 4. hvítvaskfyriskipanini, og hevur við sær, at reglur um skrá yvir veruligar eigarar í føroyskum kapitalfeløgum verða settar í gildi. Ásetingin í uppskotinum er í ávísan mun ein víðkan av galdandi reglum um skráseting av legalum eigarum, sbr. § 58 í vinnufelagalógini.

Av 4. hvítvaskfyriskipanini framgongur, at nágreiniligar og dagførdar upplýsingar um tann veruliga eigaran hava avgerandi týdning fyri at kunna spora lógbrótarar, ið annars kunnu krógva sín samleika aftanfyri vinnufelagsbygnaðir. Fyri at skapa størri gjøgnumskygni og harvið bøta um møguleikan at forða fyri misnýtslu av løgfrøðiligum persónum, hava ES-limalondini skyldu at tryggja, at upplýsingar um veruligan eigaraskap eru goymdar í eini høvuðsskrá, sum liggur uttanfyri fyritøkuna.

Lóggávan í Føroyum eigur á hesum økinum at samsvara við ta í grannalondunum og í Evropa annars. Skotið verður tí upp, at feløg, sum eru fevnd av vinnufelagalógini, skulu fáa til vega upplýsingar um veruligu eigarar teirra, sbr. allýsingina av veruligum eigarum og rættindi teirra í § 1, nr. 2 í hesum lógaruppskotinum. Ítøkiliga hevur hetta við sær, at felagið skal eyðmerkja veruligu eigararnar, undir hesum seta í verk neyðug tiltøk, til tess at staðfesta samleikan hjá veruligu eigarunum, ella staðfesta, at tað ikki eru veruligir eigarar í felagnum, og harafturat fáa

til vega upplýsingar um teir eyðmerktu veruligu eigararnar, undir hesum síggja til at skjalprógva, hvussu felagið hevur staðfest samleikan hjá veruligu eigarunum.

Ásetingin er ikki galdandi fyri deildir hjá útlendskum feløgum ella líknandi, sum eru skrásett í Føroyum, tí har er talan um sekundera etablering, og harvið ikki ein løgfrøðiligan persón. Sama ger seg galdandi fyri deildir í Føroyum hjá føroyskum feløgum, tá hesar heldur ikki eru løgfrøðiligir persónar.

Veruligir eigarar í kapitalfeløgum, sbr. allýsingina av veruligum eigarum í § 1, nr. 2 í hesum lógaruppskotinum, eru í byrjanarstøðu fysiskir persónar, sum beinleiðis ella óbeinleiðis sita við ella hava ræði á nóg stórum parti av kapitalpørtunum ella atkvøðurættindunum í einum felag ella hava ræði á annan hátt. Ognarræði upp á meiri enn 25 prosent er ein ábending um veruligan eigaraskap. Hetta útilokar tó ikki, at ein annar fysiskur persónur við støði í avtalu ella líknandi við ein ella fleiri eigarar faktiskt hevur ræði á nevndu eigarapørtum. Er talan um, at ein fysiskur persónur hevur eigaraskap og ein annar hevur ræði, eru báðir at meta sum veruligir eigarar. Er talan um ein løgfrøðiligan persón, sum hevur ognarræði yvir eigarapartar, eru tað fysisku persónarnir aftanfyri, sum møguliga skulu metast sum veruligir eigarar. Hetta er eisini galdandi í mun til útlendskar persónar – bæði løgfrøðiligar og fysiskar.

Víst verður til § 1, nr. 2 í lógaruppskotinum og viðmerkingarnar til hesa.

Eftir uppskotinum til  ásetingina hava feløgini, fyri at staðfesta hvør veruliga eigur ella hevur ræði á felagnum, skyldu til at gera neyðugu kanningarnar.

Kravið um at hava kunnleika til veruligar eigarar hevur samband við kravið í hvítvasklóggávuni um, at persónar og fyritøkur, sum eru fevnd av lógini, skulu fáa greiðu á eigara- og ræðisbygnaðinum og eyðmerkja veruligu eigararnar.

Um ein fysiskur persónur eigur meira enn 25 prosent av atkvøðunum ella kapitalinum, og um hesin gjøgnum avtalu hevur avhendað atkvøðurættin til eigarapartarnar til ein annan, t.d. ein fysiskan persón sum trygd fyri panti ella líknandi, skulu báðir fysisku persónarnir metast sum veruligir eigarar.

Tað er uttan týdning, hvørt talan er um beinleiðis ella óbeinleiðis eigaraskap, tí upplýsingar skulu fáast til vega um persónar, sum eru aftanfyristandandi. Tað er tað samlaða ognarhaldið ella ræðið, sum hevur avgerandi týdning fyri, um ein fysiskur persónur er veruligur eigari.

Er eigarin almennur myndugleiki, verður mett, at eingin fysiskur persónur eigur ella hevur ræði. Metingin av, hvørt ein ella fleiri persónar eru veruligir eigarar, vil tó altíð vera ein ítøkilig meting.

Eru tað eftir tílíkari meting eingir fysiskir persónar í myndugleikanum, sum hava nóg stórt ræði, má leiðsla felagsins skrásetast sum veruligi eigarin. Er talan um eitt felag, sum ein grunnur í nóg stóran mun eigur ella hevur ræði á, eru nevndarlimir grunsins at meta sum veruligir eigarar, sbr. uppskotnu reglurnar um grunnar, har nevnd grunsins altíð er veruligur eigari.

Um ein fysiskur persónur t.d. eigur ella hevur beinleiðis ræði á 10 prosentum í einum partafelagi og 20 prosentum av sama felagi gjøgnum eitt felag, sum viðkomandi eigur 100 prosent, er viðkomandi persónur veruligur eigari við 30 prosentum av tí fyrra felagnum.

Skyldan hjá felagnum at fáa til vega upplýsingar um veruligu eigararnar hevur eisini við sær, at felagið í neyðugan mun skal tryggja dagførdar upplýsingar um veruligu eigararnar.

Hvussu ofta dagført verður, valdast ítøkiligu viðurskiftini í felagnum. Tó er tað umráðandi, at upplýsingarnar um veruligu eigararnar ikki blíva statiskar. Felagið skal tí í sambandi við aðalfund ella líknandi sum tað minsta síggja til at hava eftirlit og í neyðugan mun dagføra sínar upplýsingar, sum treytað í uppskotnu ásetingini. Í tí føri broytingar eru í longu skrásettum upplýsingum, skulu upplýsingarnar um veruligu eigararnar dagførast. Tað kunnu møguliga vera broytingar í slagi og vavi av rættindum, undir hesum øking av eigarapørtum, broyting í atkvøðum, at sáttmáli verður gjørdur ella heldur uppat ella líknandi viðurskifti.

Við øðrum orðum er tað skyldan hjá felagnum í neyðugan mun at eyðmerkja og fáa til vega upplýsingar frá tí ella teimum veruligu eigarunum.

Eyðmerkingaruppgávan er fyri tey flestu feløgini greið og ikki so torgreidd, tí meginparturin av feløgunum hevur bert ein ella fáar eigarar. Harumframt eru feløgini partur av einføldum samtaksbygnaði við einum móðurfelagi og einum avmarkaðum tali av rakstrarfeløgum. Hjá nøkrum fáum feløgum er samtaksbygnaðurin meiri torgreiddur, og fyri hesi feløg kann eyðmerkingaruppgávan vera meira langrøkin.

Kravið um kunnleika til veruligu eigararnar er ikki nýtt, tí hetta hevur verið í hvítvasklógini í fleiri ár. Tí verða ikki í hesum lógaruppskotinum ásettar ítøkiligar reglur um, hvussu upplýsingarnar verða útvegaðar, tá hetta valdast bygnaðin í felagnum, um talan er um føroyskar ella útlendskar eigarar, um upplýsingarnar í viðkomandi landi eru alment atkomuligar o.s.fr.

Roknað verður við, at eigarabók felagsins er grundarlagið hjá felagnum at fáa kunnleika til eigararnar. Við støði í eigarabókini kann felagið eyðmerkja fysisku og løgfrøðiligu persónarnar, ið eru eigarar, og haðani royna at eyðmerkja veruligu eigararnar. Feløgini kunnu eisini nýta ársfrásagnir hjá teimum feløgum, sum eru legalir eigarar, harafturat almennu skráirnar, sum eru til taks fyri at finna upplýsingar um veruligar eigarar. Til dømis kann tað vera almenna eigaraskráin og skráin yvir veruligar eigarar, sum skotið er upp í hesum lógaruppskoti.

Felagið skal gera allar hóskandi royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar, og skal felagið til eina og hvørja tíð kunna skjalprógva fyri m.a. Føroya Landfúta og Skráseting Føroya, hvat gjørt er, harumframt hvørja eyðmerking, felagið hevur gjørt av veruliga eigaranum, sbr. stk. 3 í uppskotinum. At gera allar hóskandi royndir ber í sær, at felagið skal gera alt, sum gerast kann, fyri at eyðmerkja veruligu eigararnar, uttan so at mett verður, at tað er óhóskandi og órímiligt at gera meira.

Tað er sostatt ikki nóg mikið, at ein veruligur eigari ikki ynskir at geva seg til kennar mótvegis felagnum, tí felagið skal í slíkum førum royna at fáa upplýsingar til vega á annan hátt. Um tað í síðsta enda ikki er gjørligt at fáa til vega upplýsingar, skal skrivast niður, hvat felagið hevur gjørt, og hví tað ikki er gjørligt at gera meira. Um felagið hevur illgruna um, at ein ella fleiri veruligir eigarar ikki vilja geva seg til kennar mótvegis felagnum, tí revsiverd viðurskifti eru, er tað ikki nóg mikið at skráseta stjórn felagsins. Í tí føri skal skal tað somuleiðis meldast løgregluni.

Umframt at feløgini skulu fáa til vega upplýsingar, undir hesum samleikaupplýsingar, hjá veruligu eigarunum, skulu tey eisini kenna rættindini hjá veruligu eigarunum. Tað hevur við sær, at felagið skal hava kunnleika um slagið og vavið av rættindum veruligu eigaranna, undir hesum upplýsingar um ítøkiliga ognarræðið hjá einstaka persóninum, og um talan er um beinleiðis eigaraskap, ella óbeinleiðis eigaraskap gjøgnum onnur feløg, fyritøkur ella líknandi, og harafturat um tað møguliga er talan um sundurbýti av atkvøðurættindum í partabrævaflokkar ella líknandi.

Harumframt skal vera upplýst, hvørt talan er um eigaraskap gjøgnum veðseting, avtalu ella á annan hátt, undir hesum hvør hevur heimild at útinna atkvøðurætt eigarans vegna. Um talan er um samtøk, skal harumframt tilskilast ketan av ráðandi feløgum, har ígjøgnum veruligur eigaraskapur kann verða útintur.

Harafturat skulu upplýsingar fáast til vega, um talan er um ræði á annan hátt, enn umrøtt er omanfyri. Tað kann t.d. vera ein persónur, sum hevur rætt til at tilnevna persónar í leiðslustovnar, ein persónur, sum í viðtøkunum hevur rætt til at góðkenna ársfrásøgn felagsins í mun til at gjalda vinningsbýti, ella ein persónur, sum við sínum ognarhaldi sjálvstøðugt kann fremja eina viðtøkubroyting ella leggja veto til eina viðtøkubroyting. Felagið skal á ein virknan hátt síggja til at innheinta upplýsingar um hetta.

Longu í dag er tað sambært galdandi hvítvasklóg eitt krav, at fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av hvítvasklógini, skulu greina ognar- og ræðisbygnaðin hjá kundum, sum ikki eru fysiskir persónar, eins og veruligu eigararnir hjá kundanum hjá fyritøkunum skulu legitimerast.

Hetta merkir, at øll sløg av feløgum, sum hava ella hava havt samband við eina fyritøku ella persón, umfatað av hvítvasklógini – t.d. peningastovnar, tryggingarfeløg, grannskoðarar, húsameklarar, sakførarar o.a. – í byrjanarstøði skulu upplýsa um veruligu eigarar felagsins frammanundan, sáttmáli um kundaviðurskifti verður gjørdur.

Væntandi hava flestu fyritøkur longu í dag í ávísan mun kunnleika til sínar veruligu eigarar, tá meira ella minni allar fyritøkur í Føroyum sannlíkt hava havt samband við t.d. ein peningastovn.

Felagið skal sambært uppskotna stk. 1, 2. pkt., eftir at felagið hevur troytt allar hóskandi eyðmerkingarmøguleikar, og við teirri treyt, at royndirnar at eyðmerkja ein ella fleiri eigarar eru skjalprógvaðar, skráseta stjórn felagsins sum veruligar eigarar í kt-skipan Skráseting Føroya.

Tað kunnu sostatt vera ítøkilig føri, har eitt felag, sambært allýsingini av einum veruligum eigara, skilt sum fysiskir persónar við beinleiðis ella óbeinleiðis eigaraskapi ella ræði, ikki hevur ein veruligan eigara, ella har tað ikki er gjørligt at eyðmerkja ein ella fleiri fysiskar persónar, sum í síðsta enda antin eiga ella hava ræði yvir felagnum.

Í tí føri – við støði í haldgóðari kanning – at tað má leggjast til grund, at felagið ikki hevur nakran veruligan eigara, skal skrásetta stjórn felagsins skrásetast sum veruligur eigari í kt-skipan Skráseting Føroya.

Stjórn felagsins hevur sambært galdandi § 10, stk. 1 í vinnufelagalógini longu í dag skyldu til at vera skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya. Um stjórnin skal skrásetast sum veruligir eigarar, skulu einstøku persónarnir soleiðis ikki skrásetast í fleiri umførum, men tað verður í

kunngerðini sbr. stk. 5, sum skal áseta nærri reglur um skráseting og almannakunngering, ásettar reglur, sum skulu viðvirka til, at tað slepst undan dupultskráseting.

Upplýsingar um tann ella teir veruligu eigararnar, undir hesum møguliga skráseting av stjórnini sum veruligir eigarar, skulu sambært stk. 2, 1. pkt. í uppskotinum skrásetast skjótast gjørligt aftaná, at felagið er vorðið kunnugt við, at tann ella teir viðkomandi persónarnir eru blivnir veruligir eigarar, ella ikki longur eru veruligir eigarar.

Ásetingin letur tað vera upp til ítøkiliga meting, hvussu leingi felagið kann bíða við at skráseta upplýsingarnar aftaná, at felagið er vorðið kunnugt við upplýsingarnar. Lagt verður tó til grund, at felagið ikki uttan serliga grund kann bíða fleiri dagar við at skráseta sínar veruligu eigarar. Skrásetingin skal sostatt gerast uttan ógrundaðan steðg, fyri at tryggja dagførdar upplýsingar.

Dátueftirlitið hevði spurningar um lógaruppskotið í mun til persónsupplýsingarlógina,
1) hvørjar persónsupplýsingar snýr tað seg um, ið verða at skráseta av Skráseting Føroya o.ø., og at lata Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og Int. Kriminalitet
2) um talan er um viðkvæmar upplýsingar,
3) um p- talið, og um
4) flutningur av persónsupplýsingum av landinum.

Viðmerkingar:

Til sp. nr. 1.
Upplýsingarnar, sum feløgini skulu savna og lata Skrásseting Føroya, og sum feløgini eftir áheitan skulu lata Føroya Landfúta og øðrum almenum myndugleikum eru upplýsingar sum eintýtt eyðmerkja viðkomandi persón, t.e. navn og bústað umframt rættindi í felagnum.

Feløgini skulu eftir áheitan lata upplýsingar Føroya Landfúta.
Harumframt skulu tey eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av eftirlitsuppgávum teirra.

Til sp. nr. 2
Talan er ikki um viðkvæmar upplýsingar.

Upplýsingar um veruligar eigarar og royndir at eyðmerkja veruligar eigarar eru í byrjunarstøðu vanligir upplýsingar. Tann viðgerð av persónsupplýsingum, sum kann fara fram sbrt. lógaruppskotinum, kann tí fara fram innanfyri karmarnar av persónsupplysingarlógini, sbrt, tó fylgjandi:

Ásetingarnar í uppskotinum samsvara við donsku LOV nr 262 af 16/03/2016 Lov om ændring af selskabsloven, lov om visse erhvervsdrivende virksomheder, lov om erhvervsdrivende fonde og forskellige andre love (Indførelse af register over reelle ejere)

Í viðmerkingunum til uppskotið ta lógina (2015/1 LF 94) varð um lógaruppskotið í mun til donsku peronsdataloven sagtVísast kann til viðmerkingarnar í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið) varð hetta viðmerkt um uppskotið í mun til donsku persondataloven.

“Datatilsynet har dog tilkendegivet, at det ikke kan udelukkes, at der kan være tilfælde, hvor en oplysning om forsøg på identifikation af reelle ejere vil have karakter af en oplysning om

strafbare forhold, jf. persondatalovens § 8. Den indsamling, opbevaring og videregivelse af oplysninger, som selskaber, fonde og lignende foreslås at være forpligtede til at foretage efter lovforslaget, vurderes ikke i alle tilfælde at kunne ske inden for de rammer, som persondatalovens § 8 sætter for privates behandling af oplysninger om bl.a. strafbare forhold. Lovforslaget indebærer således på dette punkt en fravigelse af persondataloven."

Til sp. nr. 3
Eftir § § 57 a, stk. 2 í vinnufelalógini um skráseting av smærri nøgd av handhavapartabrøvum kann p- talið verða skrásett í kt- skipan Skráseting Føroya.

Í 57 a, stk. 3 í lógini er ásett, at upplýsingar, sum eru skrásettar sbrt. stk. 1 og 3, kunnu einans latast víðari til aðrar almennar myndugleikar. Upplýsingar kunnu einans latast víðari, um upplýsingarnar eru neyðugar, fyri at almenni myndugleikin kann røkja sínar eftirlitsuppgávur, og um upplýsingarnar verða latnar í samsvari við løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Eftir uppskotinum ásetur landsstýrismaðurin Skráseting Føroya nærri reglur um skráseting og kunngering av upplýsingum eftir stk. 1 og 2 í kt- skipan Skráseting Føroya, undir hesum hvørjar upplýsingar skulu skrásetast í kt- skipanini. Verður í hesum ásetingunum reglur um skráseting av p- tali, skul hesar eisini vera í samsvari við § 57 a.

Til sp. nr. 4
Aftaná hoyringina er uppskotið broytt soleiðis, at Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet er broytt til Føroya Landfúta.

***Til nr. 5*** *(Broyting av revisáetingini í § 319, stk. 1)*
Skotið verður upp at víðka galdandi revsiáseting í § 319, stk. 1 í vinnufelagalógini til eisini at fevna um ásetingarnar í § 58 a, stk. 2 og 3 um skráseting og at geva upplýsingar um veruligar eigarar víðari.

Revsing við bót er skotin upp fyri at fylgja 4. hvítvaskfyriskipanini, sum krevur, at limalondini tryggja, at skyldubundnu eindirnar kunnu ábyrgjast fyri brot á nationalar ásetingar soleiðis, at endamálið við fyriskipanini verður rokkið mest effektivt. Mett verður, at revsing við bót, er best egnað til at tryggja, at fyritøkan fylgir kravinum um skráseting og víðarilatan av upplýsingum um veruligar eigarar.

Tað fylgir av 319, stk. 1, í vinnufelagalógini, at tað kann áleggjast feløgum v.m. (løgfrøðiligum persónum) revsiábyrgd eftir kapitli 5 í revsilógini. Harumframt gongur fram av§ 27, stk. 1, 1. pkt. í revsilógini, at revsiábyrgd hjá løgfrøðiligum persóni er treytað av, at lógarbrot er framt innanfyri fyritøkuna, sum kann roknast einum ella fleiri persónum, sum eru knýttir at fyritøkuni, ella tí løgfrøðiliga persóninum sum slíkum.

Í tí føri, har revsiásetingarnar snúgva seg um skyldur ella forboð fyri fyritøkuna, eru møguligu revsisubjektini fyritøkan og/ella ein ella fleiri persónar við tilknýti til fyritøkuna, sum oftast eru tað limir í leiðsluni. Byrjanarstøðið er, at ákæra verður reist móti fyritøkuni (t.v.s. løgfrøðiliga persóninum) fyri lógarbrot, men at hetta kann kombinerast við ákæru móti einum ella fleiri persónum við tilknýti til fyritøkuna, um ein ella fleiri av hesum persónum tilætlað

ella av grovum ósketni hava viðvirkað til lógarbrotið, og lógarbrotið ikki hevur eyðkenni av at vera av minni týdningi.

Í byrjanarstøði verður ákæra ikki reist móti teimum í lægri starvi. Hetta hevur við sær, at um leiðslurnar í fevndu fyritøkunum ikki halda skylduna at fáa til vega, varðveita og skráseta upplýsingar um veruligar eigarar, undir hesum møguliga dagligu leiðsluna, umframt møgulig manglandi víðarilatan av nærri upplýsingum um royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar og skjalprógv, verður revsað við bót.

***Til nr. 6*** *(Broyting av revisáetingini í § 319, stk. 4)*
Í § 319, stk. 4 í vinnufelagalógini er ásett, at í fyriskipanum, settar í gildi við heimild í vinnufelagalógini, kann verða ásett revsing við bót.

Skotið verður upp at broyta hesa áseting soleiðis, at tað frameftir eisini kann verða ásett revsing við bót fyri brot á reglur, ásettar við heimild í § 57 a, stk. 6 og § 58 a, stk. 5 í lógini, um ávikavist skráseting av eigaraupplýsingum um handhavapartabrøv og veruligar eigarar.

Eftir § 57 a, stk. 6 í vinnufelagalógini kann Skráseting Føroya áseta nærri reglur um skráseting av eigaraupplýsingum um handhavapartabrøv í kt-skipan Skráseting Føroya, undir hesum hvørjar upplýsingar ognari/eigari (erhververen) ella avhendari (overdrageren) sjálvur kann ella skal skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya.

Galdandi ásetingar um skráseting av handhavapartabrøvum eru revsiálagdar við bót, sbr. § 319, stk. 1, 1. pkt. Tá brot á reglurnar um skráseting av handhavapartabrøvum er álagt revsing við bót, verður skotið upp at taka § 57 a, stk. 6 við í uppreksingina í § 319, stk. 4 soleiðis, at tað verður gjørligt eisini at áseta revsing við bót fyri brot á ásetingar í reglum, settar í gildi við heimild í § 57 a, stk. 6.

Eisini verður skotið upp, at tann í § 1, nr. 5 í uppskotnað 58 a, stk. 5 eisini verður tikin við í uppreksingini í § 319, stk. 4. Hetta hevur við sær, at tað eisini verður gjørligt at áseta revsing við bót fyri brot á ásetingar í fyriskipanum, settar í gildi við heimild í § 58 a, stk. 5, um nærri reglur um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um veruligar eigarar. Skotið verður upp, at ásetingarnar í § 58 a, stk. 2 og 3, um skráseting av veruligum eigarum, verður revsað við bót.

**Til § 2**

***Til nr. 1*** *(Broyting av § 2, stk. 3)*
Í § 2, stk 1, 1. pkt. í vinnufyritøkuælógini er ásett: “Stk. 3. Bortset fra reglerne i kapitel 1, 2 og 7 finder denne lov ikke anvendelse på enkeltmandsvirksomheder, interessentskaber og kommanditselskaber

Í dag eru sostatt ikki allar reglurnar í vinnufyritøkulógini galdandi fyri allar fyritøkurnar, sum eru fevndar av lógini.

Fyri at tryggja, at fyritøkurnar, fevndar av lógini, eisini fara at verða fevndar av uppskotnu ásetingini um, at veruligu eigararnir í fyritøkuni skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya, er tí skotið upp, at í § 2, stk. 3, 1. pkt. verður sett ein tilvísing til §§ 15 f og 15 h, sum inniheldur uppskotnu ásetingarnar.

Uppskotna broytingin er ein fylgja av § 2, nr. 3 í lógaruppskotinum, sum hevur við sær nýggjar §§ 15 g og 15 h. Eftir hesum ásetingunum skal ein fyritøka, fevnd av hesi lóg, einstaklingafyritøkur undantiknar, hava kunnleika til veruligu eigararnar í fyritøkuni, undir hesum upplýsingar um rættindini hjá veruligu eigarunum. Ásetingin hevur harumframt við sær, at upplýsingarnar skulu skrásetast í eini skrá yvir veruligar eigarar.

Skyldan at skráseta veruligar eigarar áliggur bert feløgum og líknandi løgfrøðiligum persónum. Sostatt er skotið upp, at einstaklingafyritøkur ikki skulu verða fevndar av ásetingini, tí hesar eru ikki mettar at vera løgfrøðiligir persónar. Deildir hjá útlendskum fyritøkum eru heldur ikki fevndar av ásetingini, tí talan er um sekundera stovnan, og tí ikki ein løgfrøðiligan persón. Samsvarandi er galdandi fyri deildir í Føroyum hjá føroyskt skrásettum feløgum. Hesar eru heldur ikki løgfrøðiligir persónar.

Við broytingini í uppskotinum verða íognarfeløg og kommanditfeløg, uttan mun til, um tey eru skrásetingarskyldug eftir lógini, fevnd av ásetingini um skráseting av veruligum eigarum í § 2, nr. 3 í lógaruppskotinum. Við hesum verður samsvar við 4. hvítvaskfyriskipanini, sum ikki ger skilna millum skrásetingarskyldug íognarfeløg og kommanditfeløg, har allir interessentar ávikavist komplementarar ábyrgjast avmarkað og samsvarandi fyritøkur, har ábyrgingin er óavmarkað. Víst verður til § 2, nr. 3 í uppskotinum og viðmerkingarnar til hesa.

***Til nr. 2*** *(Broyting av § 15, stk. 1, 1. pkt.)*
Sambært galdandi áseting í § 15 d í vinnufyritøkulógini skulu upplýsingar um navn, starv og bústað hjá limunum í leiðsluni altíð síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya.

Innihaldið í ásetingini í uppskotinum er framhald av innihaldinum í higartil galdandi áseting, men skotið verður upp at nágreina, at kravið um upplýsingar frameftir skal fevna um allar persónar, ið eru skrásettir í kt-skipan Skráseting Føroya.

Ásetingin fevndi áður bert um leiðslulimir, men ásetingin í uppskotinum skal tryggja, at eisini upplýsingar um til dømis eigarar – bæði legalar og veruligar – frameftir skal síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya.

Áður var krav um, at starv leiðslulimanna skuldi dagførast, men mett verður ikki, at tað er neyðugt, at hetta skal halda fram, tí hetta er upplýsing, sum ikki verður brúkt longur. Mett verður tí, at hetta er ein óneyðug byrða mótvegis feløgunum. Tað fer framhaldandi at síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya hvørja funkjón einstaki persónurin hevur havt í felagnum.

***Til nr. 3*** *(Nýggjar §§ 15 g og § 15 h)*
Uppskotið hevur við sær, at tað skal vera ein skrá yvir veruligar eigarar í føroyskum feløgum og øðrum løgfrøðiligum persónum, undir hesum fyritøkum, sum eru fevndar av vinnufyritøkulógini, einstaklingafyritøkur undantiknar, sum ikki eru løgfrøðiligir persónar og tí ikki fevndar av fyriskipanini.

Í § 2, nr. 3 verður tí skotið upp, at tvær nýggjar ásetingar verða settar inn í vinnufyritøkulógina, § 15 g og § 15 h. § 15 g í uppskotinum hevur við sær skyldu til m.a. skráseting av veruligum eigarum. § 15 h í uppskotinum allýsir, hvør skal fatast sum veruligur eigari í fyritøkunum, sum talan er um.

***§ 15 g***
Uppskotna ásetingin er bygd upp samsvarandi ásetingini í uppskotinum til § 58 a í vinnufelagalógini, sbr. § 1, nr. 4 í uppskotinum. Víst verður tí til viðmerkingarnar til hesa áseting.

Fyritøkur, sum eru fevndar av vinnufyritøkulógini, skulu, sambært § 15 g, stk.1, 1. pkt. í uppskotinum, fáa til vega upplýsingar um sínar veruligu eigarar, sbr. uppskotið til § 15 h í uppskotinum, undir hesum rættindini hjá veruligum eigarum.

Sambært stk. 1, 2. pkt., sum skotin er upp, skulu limirnir í dagligu leiðsluni skrásetast sum veruligir eigarar, um felagið hevur troytt allar rímiligar eyðmerkingarmøguleikar, og undir teirri fyritreyt, at royndirnar at eyðmerkja ein ella fleiri veruligar eigarar verður skjalprógvað.

Tað kunnu verða ítøkilig føri, har ein fyritøka sambært allýsingini av einum veruligum eigara, skilt sum fysiskur persónur við beinleiðis ella óbeinleiðis eigaraskapi ella ræði, ikki hevur ein tílíkan, ella tað ikki er gjørligt at eyðmerkja ein ella fleiri fysiskar persónar, sum antin í síðsta enda eiga ella hava ræði á felagnum.

Um tað í tílíkum føri - við støði í nóg góðum skjalprógvum – má leggjast til grund, at fyritøkan ikki hevur nakran veruligan eigara, skal skrásetta dagliga leiðslan skrásetast sum veruligur eigari í kt-skipan Skráseting Føroya. Hetta samsvarar við galdandi § 12, stk. 3 í hvítvasklógini, har hesir persónar eisini skulu skjalprógvast (legitimeres) sum veruligir eigarar í sambandi við “ kenn-tín-kunda” mannagongdirnar sambært hvítvasklógini.

4. hvítaskfyriskipanini umrøður eina skyldu til at skráseta tann ella teir fysisku persónarnar, sum eru “senior managing official(s)”. Hetta hugtak er ikki til í vinnufyritøkulógini. Í hvítvaskfyriskipanini verður viðvíkjandi allýsingini av “ senior management” víst til ein persón, sum hevur kunnleika til váðan hjá vikomandi fyritøku av at blíva vavd upp í hvítvask ella fígging av yvirgangi, og sum kann taka neyðugar avgerðir í sambandi við hetta. Tað er tí hóskandi at skráseta dagligu leiðsluna.

Í vinnufyritøkulógini eru ikki ásettar reglur um ítøkiligan leiðslubygnað, svarandi til t.d. reglurnar í vinnufelagalógini. Tað er sostatt ikki krav um ein serligan leiðslubygnað í hesum fyritøkum, men tað sæst av § 11, stk. 1, at har skal vera ein leiðsla, sum skal skrásetast. Tað kann tó í praksis vera talan um eina nevnd, eina stjórn ella okkurt triðja. Um tað bert er ein leiðslustovnur, t.d. ein nevnd, er hetta dagliga leiðslan. Eru tað fleiri leiðslustovnar, t.d. nevnd og stjórn, byggir tað á ítøkiliga meting, har stjórnin er dagliga leiðslan í mun til eina møguliga nevnd, sum stendur fyri yvirskipaðu leiðsluni. Um tað eru fleiri limir í dagligu leiðsluni, skulu allir limirnir skrásetast.

Leiðslan hevur sambært galdandi § 11, stk. 1 í vinnufyritøkulógini í dag skyldu til at vera skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya. Um dagliga leiðslan skal skrásetast sum veruligir eigarar, skulu einstøku persónarnir ikki skrásetast fleiri ferðir, men tað verða í kunngerðini, sbr. stk. 5, har tað skulu ásetast nærri reglur um skráseting og almannkunngering, settar reglur, sum skulu viðvirka til, at tað slepst undan dupultskráseting.

Sambært galdandi § 2, stk. 3 í vinnufyritøkulógini, verða ásetingarnar í lógini í byrjanarstøði ikki nýttar upp á íognarfeløg og kommanditfeløg. Tó verða kapittul 1 um nýtsluøki og allýsingar lógarinnar, kapittul 2 um navn og prokura lógarinnar og kapittul 7 um revsiásetingar

nýttir upp á hesar fyritøkur. Harumframt er galdandi ein røð av øðrum ásetingum um skráseting, um allir íognarar ella komplementarar ábyrgjast avmarkað.

Sambært galdandi ásetingum er tað sostatt fleiri íognarafeløg og kommanditfeløg, sum ikki hava skyldu til at lata seg skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya, undir hesum heldur ikki skyldu til at skráseta upplýsingar um leiðsluna hjá fyritøkuni.

Eftir uppskotinum skulu hesar fyritøkur verða fevndar av skylduni at hava kunnleika til sínar veruligu eigarar, og evsta dagliga leiðslan skal verða skrásett sum veruligir eigarar, um tað ikki kunnu eyðmerkjast fysiskir persónar, sum annars eru at meta sum veruligir eigarar. Í uppskotinum til § 15 g, stk. 1, 3. pkt. er tí skotið upp, at ein leiðsla skal skrásetast í øllum førum. Hetta er galdandi uttan mun til, um viðkomandi fyritøka annars ikki hevur skyldu til at vera skrásett sambært lógini.

Í uppskotinum til § 15, stk. 2, 1. pkt. er skotið upp, at upplýsingarnar um tann ella teir veruligu eigararnar, undir hesum møgulig skráseting av stjórnini sum veruligir eigarar, skulu skrásetast skjótast gjørligt aftaná, at tann ella teir viðkomandi persónarnir eru blivnir veruligir eigarar, ella ikki longur eru veruligir eigarar. Ásetingin leggur upp til eina ítøkiliga meting av, hvussu leingi fyritøkan kann bíða við at skráseta upplýsingarnar frá tí løtu, tá fyritøkan fær kunnleika um upplýsingarnar. Lagt verður tó til grund, at fyritøkan ikki uttan serliga viðurkenningarverduga orsøk kann bíða fleiri dagar við at skráseta sínar veruligu eigarar. Skrásetingin skal soleiðis fremjast uttan ógrundaðan steðg til tess at tryggja tíðarbæri (aktualitet) í skránni.

Skráseting Føroya ásetur tær nærri umstøðurnar viðvíkjandi skráseting og almannakunngering av upplýsingum um veruligar eigarar, sbr. viðmerkingarnar til stk. 5 í uppskotinum.

Harumframt skal fyritøkan sambært stk. 2, 2. og 3. pkt. goyma upplýsingarnar um veruligu eigararnar og royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar í 5 ár aftaná at eigaraskapurin er hildin uppat, ella aftaná at roynt er at fremja eyðmerkingina.

Heldur fyritøkan uppat, skal síðst skrásetta leiðsla tryggja, at upplýsingarnar um og skjalprógv fyri kanning av tí ella teimum veruligu eigarunum kunnu fáast til vega 5 ár aftaná at eigaraskapurin er hildin uppat ella eyðmerkingin er framd.

Reglurnar í uppskotinum um skylduna at goyma royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar eru í samsvari við 4. hvítvaskfyriskipanina. Har sæst, at eindirnar, sum eru fevndar av ásetingini, skulu goyma upplýsingar um tey tiltøk, sum gjørd eru til tess at eyðmerkja veruligu eigararnar. Tá upplýsingarnar skulu kunna latast til t.d. SØIK, og tá vanliga fyrningarfreistin er 5 ár, er nevnda tíðarskeið mett hóskandi.

Harumframt verður skotið upp í stk. 3, at nærri upplýsingar um veruligar eigarar og royndir at eyðmerkja veruligar eigarar, umframt skrásettu upplýsingarnar, undir hesum til dømis upplýsingar um fremjanina av eyðmerkingini, skulu latast SØIK og øðrum almennum myndugleikum, tá biðið verður um tað. Roknað verður við, at myndugleikarnir bert biðja um upplýsingarnar beinleiðis frá avvarðandi fyritøkum í tann mun, upplýsingarnar ikki frammanundan eru atkomuligar í kt-skipan Skráseting Føroya.

Víst verður til § 1, nr. 4 í uppskotinum, og viðmerkingarnar til ásetingina, ið snúgva seg um samsvarandi ásetingar í § 58 a í vinnufelagalógini.

Skotið verður upp í stk. 4, at stk. 1-3 ikki er galdandi fyri fyritøkur, hvørs eigarapartar eru tiknir upp til handils á einum reguleraðum marknaði ella einum samsvarandi, sum er undir upplýsingarskyldu í samsvari við ES-rættin ella samsvarandi altjóða standardum. Tílíkar fyritøkur eru undir serligum reglum í fíggjarligu lóggávuni, sum hevur við sær, at hóskandi gjøgnumskygni er í sambandi við upplýsingar um eigaraskap. Reglurnar um skráseting av veruligum eigarum galda sostatt heldur ikki, um eigarapartar eru upptiknir til handils á einum marknaði uttanfyri ES, ið hevur reglur, sum svara til reglurnar á einum reguleraðum marknaði. Tað avgerandi er, um hóskandi gjøgnumskygni er á hesum samsvarandi marknaðunum í mun til ES-rætt ella altjóða standardir. Hugtakið "samsvarandi altjóða standardum" stavar frá 4. hvítvaskfyriskipan og skal tulkast samsvarandi hesi.

Tað fylgir harumframt av allýsingini av einum veruligum eigara, at tað ikki eru veruligir eigarar í fyritøkum, hvørs eigarapartar eru upptiknir til handils á einum reguleraðum marknaði ella samsvarandi marknaði, sum er undir upplýsingarskyldu samsvarandi ES-rætti ella samsvarandi altjóða standardum.

Sambært stk. 5 í uppskotinum skal Skráseting Føroya áseta nærri reglur um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um veruligar eigarar, undir hesum upplýsingar, sum fyritøkan sjálv kann ella skal skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya. Tað kann møguliga vera gjøgnum einum fráboðara. Skotið verður upp, at Skráseting Føroya kann áseta reglur um, at ítøkiligar upplýsingar kunnu undantakast almannakunngering. Víst verður til § 1, nr. 4 í uppskotinum og viðmerkingarnar til ásetingina. Kunngerðin skal gerast soleiðis, at tað í mest møguligan mun slepst undan dupultskráseting í sambandi við skrásetingar í almennu eigaraskránni.

Harumframt skal tryggjast, at longu skrásettar upplýsingar í skránni hjá Skráseting Føroya í mest møguligan mun verða endurnýttar, t.d. upplýsingar um leiðsluna í fyritøkuni. Á sama hátt skal leggjast upp fyri, at eru upplýsingarnar, sum eru skrásettar, sum ikki lúka upplýsingarkravið, skal kunngerðin gerast soleiðis, at bert tær upplýsingar, sum mangla, skulu skrásetast.

Kunngerðin skal harumframt áseta nærri reglur um, hvussu tey higartil skrásettu íognarfeløgini og kommanditfeløgini fremja kravdu skrásetingina av sínum veruligu eigarum ella møguliga dagligu leiðsluni.

Upplýsingarnar um veruligu eigararnar og rættindi teirra skulu vera nøktandi, neyvar og dagførdar, sum Skráseting Føroya kann staðfesta við stakroyndum, sbr. galdandi § 15 c í vinnufyritøkulógini. Sambært hesi áseting kann Skráseting Føroya altíð venda sær til fráboðara ella fyritøkuna, fyri at fáa skjalprógvað skrásettu upplýsingarnar.

Dátueftirlitið hevði spurningar um lógaruppskotið í mun til persónsupplýsingarlógina, og verður víst til pkt. 1.5 Ummæli og Ummælisskjal og serligu viðmerkingarnar til § 1 nr. 4.

***§ 15 h***
Í § 15 h verður skotið upp at áseta eina allýsing fyri veruligar eigarar í fyritøkum, fevndar av vinnufyritøkulógini, undantikið einstaklingafyritøkur.

Samsvarandi § 1, nr. 2 í uppskotinum, verður skotin upp ein allýsing av veruligum eigarum, sum samsvarar við grein 3, stk. 6, litra a í 4. hvítvaskfyriskipanini. Ásetingin hevur við sær, at

fysiskir persónar, sum í síðsta enda beinleiðis ella óbeinleiðis hava ræði ella á annan hátt fremja ræði yvir fyristøkuni, eru veruligir eigarar í fyritøkuni.

Í sambandi við uppskotið til ásetingina í vinnufelagalógini, sbr. § 1, nr. 2 í lógaruppskotinum, er eigaraskapur í hesum fyritøkum ikki eyðkendur av vera kapitalfeløg, men eru perónsfeløg, t.v.s. at í eigaraskapur verður ikki útinntur við støði í innskotnum kapitali. Í fyritøkum, fevndar av vinnufyritøkulógini, er ikki krav um minimumskapital, og eigaraprógv kunnu ikki gevast út ella atkvøðast eftir eigarapørtum. Byrjanarstøðið fyri hesar fyritøkur er sostatt ofta, at luttakararnir atkvøða eftir meginregluni “ein maður, ein atkvøða” ella eftir samhandli ella avhending til felagið. Seinast nevnda atkvøðumannagongd eyðkennir ofta lutafeløg.

Tá tað sum útgangsstøði ikki er talan um atkvøðugreiðslu eftir kapitali í fyritøkuni, sum er fevnd av vinnufyritøkulógini, er neyðugt at gera eina ítøkiliga meting av eigaraskapinum og ræðinum, so teir veruligu eigararnar í fyritøkuni verða eyðmerktir. Metingin av hesum verður gjørd eftir § 1, nr. 2 í uppskotinum. Víst verður til hesa áseting og viðmerkingarnar til ásetingina, sum ásetur eina allýsing av veruligum eigara í vinnufelagalógini.

Í sambandi við kommanditfeløg er umráðandi at vera varugur við tann sermerkta bygnaðin, vinnufyritøkuformurin hevur, har komplementarurin er tann fult ábyrgjandi luttakarin, meðan kommanditistarnir eru teir persónar, sum útinna tey vanligu fyrisitingarligu og fíggjarligu rættindini, eitt nú atkvøðurætt á aðalfundi og at taka ímóti vinningsbýti í sambandi við teirra luttøku í fyritøkuni.

Kommanditistarnir skulu í øllum førum metast í mun til allýsingina av veruligum eigarum, tá teirra luttøka í felagnum hevur eyðkenni av eigaraskapi.

Viðvíkjandi komplementarinum er tað eitt krav, at hesin somuleiðis fær tillutað fíggjarlig og rakstrarlig rættindi, tó sum útgangsstøði ikki undir somu korum sum kommanditistarnir.

Komplementarurin fær soleiðis ikki fíggjarlig rættindi sum vinningsbýti, men í staðin eina nærri ásetta kompensasjón fyri fíggjarliga váðan, komplementarurin hevur við leiklutinum hjá viðkomandi sum fult ábyrgjandi luttakari í fyritøkuni. Komplementarurin fær harumframt heldur ikki tillutað fyrisitingarlig rættindi við atkvøðum á jøvnum føti við kommanditistarnar, men fær ofta í staðin vetorætt á aðalfundinum innan eitt ella fleiri øki.

Sjálvt um komplementarurin sum útgangstøði ikki verður mettur sum eigari, kunnu tað vera føri, har tað kortini má gerast ítøkilig meting av, um samlaðu rættindini, sum komplemantarurin hevur fingið, hava við sær, at viðkomandi kortini er at meta sum veruligur eigari.

Skotið verður upp, at § 15 g, stk. 2 og 3 verða revisálagdar eftir uppskotinum til broyting av revisásetingini í § 23, stk. 1 í lógini, sbr. § 2, nr. 4.

***Til nr. 4***

Skotið verður upp at víðka galdandi revsiáseting í § 23, stk. 1 í lógini um vinnurekandi virki, so hendan eisini fer at fevna um ásetingarnar í § 15 g, stk. 2 og 3, um skráseting og víðarigeving (videregivelse) av upplýsingum um veruligar eigarar.

Uppskotið er í samsvari við 4. hvítvaskfyriskipan, sum krevur, at ES-limalondini tryggja, at ábyrgjandi eindirnar kunnu ábyrgjast fyri brot á nationalu ásetingarnar, soleiðis at endamálið

við fyriskipanini verður rokkið mest effektivt. Mett verður, at revsing við bót er best egnaða revsitiltak at tryggja, at fyritøkurnar uppfylla kravið um skráseting og víðarigeving av upplýsingum um veruligar eigarar.

Tað fylgir av § 23, stk. 3 í vinnufyritøkulógini, at áleggjast kann feløgunum v.m. (løgfrøðiligum persónum) revsiábyrgd eftir kapitli 5 í revsilógini. Afturat hesum sæst av § 27, stk. 1, 1. pkt. í revsilógini, at revsiábyrgd hjá løgfrøðiligum persóni er treytað av, at tað innan fyri fyritøkuna er framt brot, har ein ella fleiri til løgfrøðiliga persónin knýttir persónar kunnu ábyrgjast ella tann løgfrøðiligi persónurin sum slíkur.

Í teimum førum, revsiáløgdu ásetingarnar snúgva seg um skyldur ella forboð hjá fyritøkuni, eru tey møguligu revsisubjektini fyritøkan sum slík og/ella ein ella fleiri persónar við tilknýti til fyritøkuna, sum oftast eru tað limir í leiðsluni.

Útgangsstøðið er, at ákæra verður reist móti fyritøkuni (tað vil siga løgfrøðiliga persóninum) fyri brot, men hetta kann kombinerast við ákæru móti einum ella fleiri persónum við tilknýti til fyritøkuna, um ein ella fleiri av hesum persónum tilætlað ella í grovum ósketni hava viðvirkað til lógarbrotið, og lógarbrotið ikki hevur lítlan týdning.

Sum útgangsstøði verður ákæra ikki reist móti lægri starvssettum. Tað hevur við sær, at brot hjá leiðsluni í viðkomandi fyritøkum á skylduna at fáa til vega, varðveita og skráseta upplýsingar um veruligar eigarar, undir hesum møguliga dagligu leiðsluna, herumframt møguliga manglandi víðarilatan av nærri upplýsingum um royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar og skjalprógv, verður revsað við bót.

**Til § 3**
Eftir § 1, stk. 1 í vinnugrunnalógini (anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde) verður lógin nýtt upp á grunnar, legatir, stiftilsir og aðrar sjálveigandi stovnar, sum verða mettir at vera vinnurekandi, undir einum nevndir vinnurekandi grunnar.

Eftir 4. hvítvaskfyriskipanini, skulu løgfrøðiligar eindir, undir hesum grunnar, hava upplýsingar um sínar veruligu eigarar og rættindi teirra. Av innganginum til 4. hvítvaskfyriskipanini gongur fram, at nágreiniligar og dagførdar upplýsingar um veruligar eigarar hevur avgerandi týdning fyri at kunna spora brotsmenn, ið annars kunnu fjala sín samleika aftan fyri vinnufelagabygnaðir. Fyri at skapa størri gjøgnumskygni og harvið bøta um møguleikan at stríðast ímóti misnýtslu av løgfrøðiligum persónum, eiga ES-limalondini at tryggja, at upplýsingar um veruligan eigaraskap verða goymdar í eini meginskrá, sum liggur uttan fyri fyritøkuna.

Uppskotið er í samsvari við 4. hvítvaskfyriskipanina, og setur nýggjar ásetingar inn í lógina, sbr. § 3, nr. 3 í uppskotinum, sum setur nýggjar §§ 56 b og § 56 c inn í lógina. Eftir hesum verður álagt vinnurekandi grunnum at fáa til vega upplýsingar um sínar veruligu eigarar og at skráseta upplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya.

Fleiri grunnar eru eftir § 1, stk. 4 í vinnugrunnalógini ikki fevndir av lógini, og heimild er eisini til at undantaka grunnar eftir stk. 5. Tað er m.a. grunnar, sum eru settir á stovn við lóg ella sbrt. lóg, og sum eru undir almennum eftirliti. Hesir grunnar skulu eftir uppskotinum eisini verða fevndir av skylduni at fáa til vega upplýsingar um sínar veruligu eigarar, og at skráseta upplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 3, nr. 1 í uppskotinum.

***Til nr. 1*** *(Nýtt stk. 8 í § 1)*
Fyri at at tryggja, at grunnar, sum í dag ikki eru fevndir av ella eru undantiknir, frameftir verða fevndir av ásetingini í uppskotinum um, at veruligir eigarar skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya, er skotið upp, at í § 1 verður sett nýtt stk. 8 við tilvísing til nýggja § 56 b, sum hevur í sær uppskotið um skráseting av veruligum eigarum, sum allýst í § § 56 c í uppskotinum.

Við uppskotnu ásetingini verða teir grunnar, sum í dag ikki eru fevndir av lógini um vinnurekandi grunnar, sbr. § 1, stk. 4 í vinnugunnalógini, og teir grunnar, sum eru undantiknir lógini, sbr. § 1, stk. 5 í vinnugrunnalógini, fevndir av § 3, nr. 3 í lógaruppskotinum um skráseting av veruligum eigarum. Tað hevur við sær, at viðkomandi grunnar frameftir skulu skráseta sínar veruligu eigarar, undir hesum nevndina, sbr. § 56 c í uppskotinum, sum allýsir veruligar eigarar í grunnum.

Uppskotna ásetingin hevur í sambandi við § 3, nr. 3 í lógaruppskotinum við sær, at hesir grunnar skulu fáa til vega og skráseta veruligu eigararnar í skránni, sum Skráseting Føroya ger. Harafturat skulu grunnar eftir áheitan lata upplýsingar um sínar veruligu eigarar og um royndir hjá grunninum at eyðmerkja sínar veruligu eigarar til SØIK og aðrar almennar myndugleikar í sambandi við teirra eftirlitsuppgávur. Víst verður til § 3, nr. 34 í lógaruppskotinum og viðmerkingarnar til hesa.

***Til nr. 2*** *(Nýggj orðing av § 56 a, stk. 1)*
Sambært galdandi áseting skulu upplýsingarnar um navn, starv og bústað hjá verandi og fyrrverandi limum í leiðsluni altíð síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya.

Ásetingin, sum skotin er upp, er framhald av higartil galdandi áseting, men skotið verður upp at nágreina, at kravið um upplýsingar frameftir skal fevna um allar persónar, sum eru skrásettir í kt-skipan Skráseting Føroya.

Áður viðvíkti ásetingin bert leiðslulimirnar, men uppskotna ásetingin skal tryggja, at eisini upplýsingar um til dømis veruligar eigarar frameftir skulu síggjast í kt-skipan Skráseting Føroya.

Áður var krav um, at starv leiðslulimanna varð dagført, men tað verður ikki mett neyðugt at halda áfram við hesum kravi, tí mett verður, at henda upplýsing ikki verður brúkt longur. Tí verður mett, at hetta er ein óneyðug byrða at halda fast við mótvegis feløgunum.

Tað fer framhaldandi at síggjast av kt-skipan Skráseting Føroya, hvørja funksjón einstaki persónurin hevur havt í felagnum.

***Til nr. 3*** *(Nýggjar §§ 56 b og 56 c)*
§ 3, nr. 3 í uppskotinum setur nýggjar §§ 56 b og § 56 c inn í lógina.

Skotið verður upp, at tað í nýggjari § 56 b verður ásett, at grunnar, sum eru fevndir av lógini um vinnurekandi grunnar, skulu savna upplýsingar um sínar veruligu eigarar, sbr. allýsingina av veruligum eigarum í § 56 c í uppskotinum.

Grunnar eru pr. definisjón sjálveigandi, og hava tí ikki veruligar eigarar. Veruligir eigarar eru tó ikki eigarar í vanligari merking, men harafturímóti fysiskir persónar, sum á ein ella annan hátt hava ræði á grunninum, ella fáa tillutað pening úr grunninum.

Grunnarnir hava sambært ásetingini í uppskotinum skyldu til at gera neyðugu kanningarnar fyri at staðfesta, hvørjir persónar eru at meta sum veruligir eigarar í grunninum. Kravið um at hava upplýsingar um veruligu eigararnar, hevur samband við kravið í § 12, stk. 3 í galdandi hvítvasklóg um, at greiða skal fáast á eigara- og ræðisbygnaðinum í grunninum og at veruligir eigarar skulu eyðmerkjast í sambandi við kenn-tín-kunda mannagongdir sambært hvítvasklógini.

Skyldan hjá grunninum at fáa til vega upplýsingar um veruligar eigarar hevur við sær, at grunnurin í neyðugan mun skal tryggja dagførdar upplýsingar um veruligu eigararnar. Tá skotið verður upp samsvarandi reglur fyri kapitalfeløg, sbr. § 1, nr. 4 í uppskotinum, verður víst til viðmerkingarnar í hesi áseting.

Umframt at grunnarnir skulu fáa til vega upplýsingar, undir hesum samleikaupplýsingar, um veruligu eigararnar, skulu teir eisini hava upplýsingar um rættindini hjá veruligu eigarunum. Tað hevur við sær, at grunnar skulu hava upplýsingar um slag og vavið av rættindum hjá veruligum eigara, undir hesum upplýsingar um kravið hjá tí einstaka persóninum til møguliga útluting úr viðkomandi grunni.

Nevndin í einum vinnurekandi grunni er altíð at meta sum veruligir eigarar, sbr. § 56 c, nr. 1 í uppskotinum. Um grunnurin sambært ásetingini einans hevur nevndina sum veruligar eigarar, skal slagið og vavið av rættindum sum meginregla ikki upplýsast, tí rættindir og skyldur hjá nevndini fylgja av lógini um vinnurekandi grunnar og viðtøkum hjá einstaka grunninum. Um serlig rættindi eru umframt hesi, skal tað tó verða upplýst um hetta.

Rættindi eru at skilja sum til dømis tær heimildir, sum veruligir eigarar hava í mun til umsiting av fæi grunsins, og serligar tilsagnir um útlutan til móttakarar og ítøkiligu krøvini í hesum sambandi frá avvarðandi grunni.

Ásetingin í uppskotinum um at skráseta veruligar eigarar í kt-skipan Skráseting Føroya er nýggj, men skyldan til at hava kunnleika um veruligu eigarar grunsins er ikki nýggj. Tað er sambært galdandi hvítvasklóg, § 12, stk. 3, eitt krav, at fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av hvítvasklógini, eftir eini váðameting skulu hava greiðu á eigara- og ræðisbygnaðinum hjá kundum, sum ikki eru fysiskir persónar, og skulu veruligir eigarar eyðmerkjast. Hetta merkir, at øll sløg av fyritøkum og øðrum løgfrøðiligum persónum, undir hesum grunnar, sum hava havt samband við eina fyritøku ella persón, ið er fevndur av hvítvasklógini – tað vil siga peningastovnar, tryggingarfeløg, grannskoðarar, húsameklarar o.a. – kunnu fáa krav um at skula upplýsa um sínar veruligu eigarar.

Sambært § 56 a, stk. 1 í vinnugrunalógini hevur nevndin longu í dag skyldu til at verða skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya. Hóast nevndin sambært uppskotinum er at meta sum veruligir eigarar, skulu einstøku persónarnir sum útgangsstøði tó ikki skrásetast í fleiri umførum.

Sambært § 56 b, stk. 2, 1. pkt. í uppskotinum skulu upplýsingar um veruligar eigarar skrásetast skjótast gjørligt aftaná, at tann ella teir viðkomandi persónarnir eru vorðnir veruligir eigarar, ella aftaná at broytingar eru gjørdar í skrásettum viðurskiftum. Viðmerkjast skal, at grunnurin eisini hevur skyldu til at skráseta møguligar broytingar í rættindunum hjá einum veruligum eigara í mun til grunnin, undir hesum slag og vavið av hesum. Um ein persónur ikki longur er veruligur eigari, skal tað eisini skrásetast.

Ásetingin leggur upp til ítøkiliga meting av, hvussu leingi grunnurin kann bíða við at skráseta upplýsingarnar frá tí, at grunnurin hevur fingið kunnleika til upplýsingarnar. Grunnurin kann tó ikki uttan serliga orsøk bíða í fleiri dagar við at skráseta sínar veruligu eigarar. Skrásetingin skal gerast í skránni uttan ógrundaðan steðg, fyri at tryggja dagførdar upplýsingar í skránni.

Av tí at allýsingin av veruligum eigarum í § 56 c í lógaruppskotinum hevur við sær, at nevnd grunsins verður at skráseta sum veruligir eigarar, skal skráseting av nevndini frameftir fremjast skjótast gjørligt eftir, at viðurskiftini eru broytt.

Grunnurin skal sambært § 56 b, stk. 2, 2. og 3. pkt. í lógaruppskotinum, varðveita upplýsingarnar um veruligu eigarar og royndir at eyðmerkja veruligu eigarar í 5 ár eftir, at viðkomandi ikki longur eru veruligir eigarar ella eyðmerkingin er framd. Heldur grunnurin uppat, skal síðst skrásetta nevnd tryggja, at upplýsingarnar um og skjalprógvini fyri kanning av tí ella teimum veruligu eigarunum kunna fáast til vega 5 ár eftir, at tey avvarðandi ikki longur eru veruligir eigarar ella eyðmerkingin er framd.

Viðmerkjast skal, at skyldan til at varðveita upplýsingar um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í grunnum og kravið um, at hesar upplýsingar og upplýsingar um veruligu eigarar skulu varðveitast í 5 ár, ikki fylgir beinleiðis av hvítvasfyriskipanini. Mett verður kortini, at tílík skylda er fortreyt fyri, at myndugleikar, sum hava málsræðið, kunnu hava neyðugt eftirlit við, at viðkomandi grunnar o.a. lúka kravið um skráseting, undir hesum gera neyðugar royndir at eyðmerkja sínar veruligu eigarar. Harumframt skulu Føroya Landfúti og aðrir viðkomandi myndugleikar altíð hava atgongd til so nógvar upplýsingar sum gjørligt um veruliga eigaraskapin hjá grunnunum.

Grunnurin skal, sambært § 56 b, stk. 3, 1. pkt. í uppskotinum, lata Føroya Landfúta nærri upplýsingar um teir veruligu eigararnar og royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar, tá biðið verður um tað. Upplýsingarnar skulu harumframt latast øðrum almennum myndugleikum, tá biðið verður um tað, jf. § 56 b, stk. 3, 2. pkt. Hetta er treytað av at myndugleikar, sum biðja um upplýsingar um veruligar eigarar, skulu nýta hesar í mun til at røkja lógarásettar eftirlitsskyldur, og tað ítøkiliga er mett at vera tørvur á at fáa upplýsingarnar. Ásetingin hevur við sær, at til dømis Skráseting Føroya og TAKS kunnu biðja um viðkomandi upplýsingar. Hesin partur í ásetingini hevur sum fremsta endamál at tryggja, at serliga Føroya Landfúti til eina og hvørja tíð hevur atgongd til aktuellar og dagførdar upplýsingar um veruligu eigararnar í grunninum.

Tað er treytað av, at mynduleikarnir einans fáa til vega upplýsingar beinleiðis frá viðkomandi grunnum í tann mun, upplýsingarnar ikki frammanundan eru atkomuligar í kt-skipan Skráseting Føroya.

Skyldan at lata upplýsingar og skjalprógv um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar, samstundis við kravinum um at skráseta upplýsingar um veruligar eigarar í eini meginskrá (kt-skipan Skráseting Føroya), skal tryggja, at serliga Føroya Landfúti og Skráseting Føroya, men eisini aðrir almennir myndugleikar, altíð hava atgongd til aktuellar og dagførdar upplýsingar um veruligu eigarar grunsins.

Sambært § 56 b, stk. 4 í uppskotinum, skal Skráseting Føroya gera kunngerð um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um veruligar eigarar, og harafturat um upplýsingar, sum grunnurin skal skráseta í kt-skipan Skráseting Føroya. Hetta kann møguliga verða gjørt

gjøgnum ein fráboðara. Harumframt ER skotið upp, at Skráseting Føroya kann áseta reglur um, at ítøkiligar upplýsingar kunnu undantakast almannakunngering.

Kunngerðin skal verða gjørd við atliti til at sleppast kann undan dupultskráseting í sambandi við møguliga longu skrásettar upplýsingar í kt-skipan Skráseting Føroya. Um upplýsingarnar ikki, sum longu eru skrásettir, og ikki fylgja upplýsingarkravinum í 4. hvítvaskfyriskipanini, skal kunngerðin verða gerast soleiðis, at bert manglandi upplýsingarnar skulu skrásetast.

Kunngerðin, sum Skráseting Føroya skal gera, skal áseta, at upplýsingar um veruligar eigarar í minsta lagi innihalda upplýsingar um fulla navn, tjóðskap, bústað og bústaðarland, slag og vav av rættindunum hjá veruliga eigaranum og persóntal og - um veruligi eigarin ikki hevur persóntal - skjalprógv, sum tryggjar eintýdda eyðmerking av viðkomandi, undir hesum føðingardag.

Upplýsingarnar um veruligar eigarar og rættindi teirra skulu vera nøktandi, neyvar og dagførdar. Hetta kann Skráseting Føroya eftirkanna við stakroyndum, sbr. galdandi § 17 í vinnufelagalógini. Sambært hesi áseting kann Skráseting Føroya til eina og hvørja tíð venda sær til fráboðara ella grunnin fyri at fáa skjalprógvað skrásettu upplýsingarnar.

Í § 56 c í lógaruppskotinum er skotið upp at áseta eina allýsing av veruligum eigarum. Allýsingin av veruligum eigarum í grunnum samsvarar við grein 3, stk. 6, litra c, jf. litra b í 4. hvítvaskfyriskipanini, ið snýr seg um sokallaðu trusts.

Sambært allýsingini í § 56 c í lógaruppskotinum, eru veruligir eigarar í grunnum sostatt tann ella teir fysisku persónar, sum í síðsta enda beinleiðis ella óbeinleiðis fremja ræði ella á annan hátt hava heimildir, sum líkjast eigaraskapi. Ásetingin í uppskotinum fer ikki út í æsir, men nevnir sum útgangsstøði nevnd grunsins og fysiskar persónar, ið hava serlig framíhjárættindi í grunninum (serliga størri útlutanarmóttakarar) ella, um einstaklingar, ið hava gagn av útlutanum úr grunninum, men sum mótvegis grunninum enn ikki hava eyðmerkt seg, tann bólkur av persónum, í hvørs høvuðsáhugamáli grunnurin er stovnaður ella virkar fyri.

Talan skal vera um fysiskar persónar, tí skrásetingarskyldan er bert galdandi fyri fysiskar persónar.

Sambært allýsingini av veruligum eigarum í 4. hvítvaskfyriskipanini, ið sum útgangsstøði viðvíkur trusts, skulu fysiskir persónar sum stovnarar eisini metast sum veruligir eigarar. Tað er tó treytað av, at einstaki persónurin hevur eitt ella annað slag av ræði, antin við heimildum, sum líkjast eigaraskapi ella á annan hátt, sum stovnari av grunni sum útgangsstøði ikki hevur.

Í allýsingini av veruligum eigarum í einum grunni er ikki krav um serligan prosentsats fyri ávirkan gjøgnum eigaraskap ella ræði, tí grunnar eru eyðkendir við ikki at hava eigarar. Tá tað sostatt ikki er talan um eigarar í vanligari merking, hevur lógarásetingin harafturímóti í sær nakrar ítøkiligar fysiskar persónar, sum kunnu javnsetast við eigarar, og, um teirra týðandi ávirkan ella partur í ognum hjá avvarðandi grunni er av ávísum slagi, eru hesir at meta sum veruligir eigarar.

Eftrir fyrisitingarligari praksis um vinnurekandi grunnar, skal ogn grunsins endaliga vera skild frá ognum stovnaranna, og ræðisheimildirnar yvir grunninum skal lutast eini í mun til stovnaran sjálvstøðugari leiðslu. Í roynd og veru hevur hetta við sær, at ognir hjá einum grunni ongantíð – hvørki heilt ella partvíst - kunnu falla aftur til stovnara grunsins. Tá ein stovnari eftir

óskrivaðum grunnareglum sostatt ikki, hvørki leypandi ella við avtøku, kann fáa part í ognum grunsins, og tá stovnari í einum grunni sum útgangsstøði ikki kann hava nakað slag av ræði, kann stovnari av vinnurekandi grunni tí sum útgangsstøði ikki vera veruligur eigari. Stovnarin er tó veruligur eigari, um stovnarin er limur í nevnd grunsins.

Harumframt ber til at veita stovnara av grunni ein avmarkaðan rætt í sambandi við avkast av ognum grunsins sum t.d. rentunýtingarrætt, bústaðarrætt ella brúksrætt, eins og stovnari eisini í undantaksføri sambært viðtøkum grunsins í ítøkiligum og avmarkaðum førum kann hava serligar heimildir til t.d. at góðkenna sølu av ognum ella líknandi.

Hesi viðurskifti hava ikki í sjálvum sær við sær, at stovnari av grunni skal metast sum veruligur eigari av grunninum, men tað kann ikki útilokast, at tað ítøkiliga kunnu vera føri, har stovnari ella onnur uttanfyristandandi skulu metast sum veruligir eigarar sum fylgja av serligum heimildum í viðtøkuni, undir hesum ávíst ræði ella eitt annað slag av heimildum, sum líkjast eigaraskapi.

Týðandi gávugevarar, stuðulsveitarar ella líknandi, ið ikki eru limir í nevnd grunsins, eru sum útgangsstøði heldur ikki at meta sum veruligir eigarar, tá ið gávugevarar v.m eru at javnseta við stovnara grunsins.

Sum tað sæst av allýsingini í § 56 c í uppskotinum, eru nevndarlimir í vinnurekandi grunni at meta sum veruligir eigarar. Uppskotna ásetingin, sum hevur við sær, at limirnir í nevndini í einum vinnurekandi grunni altíð eru at meta sum veruligir eigarar, er í samsvari við grein 3, stk. 6, litra c, í 4. hvítvaskfyriskipanini, ið vísir til litra b í ásetingini, sum snýr seg um sokallaði trusts. Tað sæst av ásetingini, at m.a. “trustee(s)” skulu skrásetast. Ein trustee í eini trust er tó vanliga fatað sum eitt slag av fyrisitara (administrator), men tá fyrisitarar hava ikki nakað málsræði viðvíkjandi leíðslu,  er tað mett at vera hóskandi, ásetingini inniheldur upplýsingar um nevndina.

Umframt nevnd grunsins eru fysiskir persónar, ið hava serlig framíhjárættindi í grunninum, ella, um einstaklingar, ið hava gagn av útlutanum úr grunninum, men enn ikki mótvegis grunninum hava eymerkt seg, tann bólkur av persónum, tann bólkur av persónum, í hvørs høvuðsáhugamáli grunnurin er stovnaður ella virkar fyri, eisini vera veruligir eigarar.

Viðvíkjandi persónum, ið hava serlig framíhjárættindi í grunninum, skal viðmerkjast, at hesir sum útgangsstøði einans eru at meta sum veruligir eigarar samsvarandi ásetingini í uppskotinum, um teir eftir viðtøkum grunsins hava rættarkrav at taka við einum ikki týdningarleysum parti av ognum grunsins.

Tað er sostatt eitt krav í sambandi við útlutingar, at ikki fyrr enn nevndin hevur avgjørt og mótvegis avvarðandi móttakara hevur givið tilsøgn um veitingina, er eitt rættarkrav hjá avvarðandi útlutingarmóttakara eftir vanligum rættarreglum.

Í ávísum vinnurekandi grunnum fer ein bólkur av persónum tó at kunna hava ein tílíkan áhuga í útlutingum grunsins, at tað frammanundan er gjørligt at eyðmerkja hesar persónar, í hvørs høvuðsáhugamáli grunnurin er stovnaður, hóast hesir ikki í fyrstu syftu hava rættarkrav at móttaka útlutingar úr grunninum. Roknað verður tó við, at talan er um fáar persónar.

Tílíkur bólkur av fólki kann í mong ár hava rætt til at móttaka ávísan part av ognum grunsins. Tað er ábyrgd nevndarinnar – burtursæð frá rímiligum avsetingum - at útluta til tey endamál, sum ásett eru í viðtøkunum.

Tað er eitt krav, at um tað sæst av viðtøkunum, at tað eru fleiri javnsett útlutingarendamál, skal tað yvir eitt áramál verða givnir einsæris fyrimunir til tað eina endamálið soleiðis at hini endamálini svíða fyri tað. Yvir ávíst tíðarskeið skal tað sostatt vera ein rímilig javnvág í útlutingunum til tey ymsu, sum hava rætt til útluting . Nevndin hevur ábyrgd av at tryggja útluting til øll endamálini, og at tað ikki reglulia verður útlutað til nøkur og onnur skulu svíða fyri tað. Hetta kann hava við sær, at ein bólkur av persónum, ið ikki hevur eitt beinleiðis rættarkrav upp á útlutingar úr grunninum, hóast hetta yvir áramál kann hava rætt til at móttaka ávísan part av ognum grunsins.

Avgerð verður tikin eftir ítøkiliga meting, hvørt ein persónur, sum hevur rætt til útluting fær serlig rættindi í grunninum. Tað má tí metast, at vanligir útlutingarmóttakarar, ið bert skulu móttaka ella móttaka eina ella heilt fáar útlutingar við avmarkaðum fíggjarligum virði í mun til samlaðu ognir grunsins, ikki eru at meta sum veruligir eigarar.

Í mun til allýsingina av veruligum eigarum í grunnum er tað sannlíkt, at tað eru fá, ið hava rætt til útluting, sum skula skrásetast sum veruligar eigarar. Kortini kunnu vera vinnurekandi grunnar, har viðtøkurnar eru so mikið ítøkiligar, at tað frammanundan ber til at siga, at avvarðandi útlutingarmóttakarar eru at meta sum veruligir eigarar. Í metingini av, hvørt endamálini hjá grunninum eru javnsett, er tað (i praksis) lagdur dentur á, um tað sæst av viðtøkunum ella stovningargrundarlagnum annars, at endamálini í einum grunni kunnu raðfestast ella avmarkast. Tí verður skotið upp, at § 56 b, stk. 2 og 3 verða revisáløgd eftir § 63, stk. 2 og stk. 3, sbr. § 3, nr. 4 og 5 í uppskotinum og serligu viðmerkingarnar til ásetingarnar.

***Til nr. 4-6*** *(Broyting av revisásetingini í § 63)*
Skotið er upp at víðka galdandi revsiáseting í § 63, stk. 2 og stk. 3 í vinnugrunnalógini til eisini at fevna um ásetingarnar í § 56, stk. 2 og 3, um skráseting og víðarilating av upplýsingum um veruligar eigarar.

Skotið verður upp, at tað kann verða álagt feløgum o.a. (løgfrøðilgum persónum) revisábyrgd eftir kapittul 5 í revislógini.

Tað sæst av § 27, stk. 1, 1. pkt. í revsilógini, at revsiábyrgd hjá løgfrøðiligum persóni er treytað av, at tað innanfyri fyritøkuna er framt brot, sum tilroknast einum ella fleiri til løgfrøðiliga persónin atknýttar persónar ella løgfrøðiliga persónin sum slíkan.

Í teimum førum, har revsiáløgdu ásetingarnar snúgva seg um skyldur ella forboð hjá fyritøkuni, eru møguligu revsisubjektini fyritøkan og/ella ein ella fleiri persónar við tilknýti til fyritøkuna, ið, sum oftast, eru limir í leiðsluni. Útgangsstøðið er, at ákæra verður reist móti einum ella fleiri persónum fyri brotið, men hetta kann kombinerast við ákæru móti einum ella fleiri persónum við tilknýti til fyritøkuna, um ein ella fleiri persónar hava viðvirkað til brotið tilætlað ella í grovum ósketni, og at brotið ikki hevur lítlan týdning.

Tó skal tað sum útgangsstøði ikki reisast ákæra móti lægri starvssettum. Tað hevur við sær, at um avvarðandi leiðslur í fyritøkunum ikki halda skylduna at fáa til vega, goyma og skráseta upplýsingar um veruligar eigarar, undir hesum møguliga dagligu leiðsluna, og herumframt møguliga ikki halda skylduna at lata víðari nærri upplýsingar um royndir at eyðmerkja veruligu

eigararnar og skjalprógv, kunnu verða revsað við bót. Víst verður til ásetingina í § 3, nr. 3 og viðmerkingarnar til hesa.

**Til § 4**

***Til nr. 1***
Skotið verður upp at tað í § 5 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi (tryggingarlógin), sum nr. 18 verður ásett ein allýsing av hugtakinum veruligur eigari.

Flestu av fyritøkunum, sum eru fevndar av tryggingarlógini ella lov om finansiel virksomhed, eru partafeløg. Skyldan hjá hesum feløgum at skráseta veruligar eigarar fylgir av § 1, nr. 4 í uppskotinum.

Tað eru tó fíggjarligar fyritøkur, m.a. sínámillum tryggingarfeløg og eftirlønargrunnar, sum ikki eru skipað sum partafeløg. Fyri hesar fyritøkur er neyðugt at áseta skylduna at skráseta veruligar eigarar í tryggingarlógini. Av somu grund er eisini neyðugt í tryggingarlógini at áseta eina allýsing av hugtakinum veruligur eigari.

Allýsingin av hugtakinum veruligur eigari samsvarar við allýsingina í § 1, nr, 2 í uppskotinum, og reglurnar um skylduna hjá fyritøkunum at savna upplýsingar at skráseta og goyma upplýsingar samsvara við § 1, nr. 4 í uppskotinum. Víst verður til hesar ásetingarnar í serligu viðmerkingunum til ásetingarnar.

***Til nr. 2***
Uppskotna ásetingin í § 4, nr. 2 (§ 17, stk. 3-6) hevur við sær, at skráin yvir veruligar eigarar, sum skotið upp í § 1, nr. 4, eisini fevnir um sínámillum tryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar, ið eru reguleraðir í tryggingarlógini.

Sínámillum tryggingarfeløg virka sum feløg (foreiningar), sum limirnir (tryggingartakararnir) eiga.

Millum limirnar verður valt eitt ávíst tal av umboðsfólki samsvarandi viðtøkunum fyri felagið, sum umboða limirnar á aðalfundinum. Umboðsfólkini velja eina nevnd millum limirnar, sum er evsta leiðsla felagsins. Nevndin setur í samsvari við viðtøkurnar eina stjórn at taka sær av dagligu leiðsluni.

Tvørgangandi eftirlønargrunnar eru eitt slag av feløgum (foreninger), har kollektivið av tryggingartakarunum/limunum eiga eginognina, uttan so at viðtøkurnar áseta annað. Viðvíkjandi leiðslu er tað galdandi, at ein eftirlønargrunnur skal hava eina nevnd, sum skal vera samansett av formanni og einum líka tali av nevndarlimum, og av hesum skal í minsta lagi helvtin verða vald av og millum limirnar í eftirlønargrunninum.

Ein tvørgangandi eftirlønargrunnur skal hava eina nevnd og eina stjórn. Samsvarandi allýsingini av veruligum eigarum verður stjórnin tí mett at vera veruligur eigari.

Tað verður mett at verða heimilað at viðarilata upplýsingar sbrt. tagnarskylduna hjá fíggjarligum fyritøkum í § 74 í tryggingarlógini um víðarilatan av trúnaðarupplýsingum, sum fyritøkan hevur skyldu til at lata víðari eftir áheitan frá viðkomandi myndugleikum við heimild í ásetingunum, sum skotin eru upp.

***Til nr. 3***
Skotið verður upp, at galdandi revsiáseting í § 215, stk. 2 verður víðkað til eisini at fevna um tær í § 4, nr. 2, uppskotnu ásetingarnar í § 17, stk. 4 og 5.

**Til § 5**
Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin ásetur, nær lógin fær gildi.

Orsøkin til uppskotið er, at neyðuga skráin til at skráseta veruligar eigarar ikki er gjørd við tað, at neyðugar tillagingar av kt-skipan Skráseting Føroya ikki eru gjørdar enn.

Tá neyðugar tillagingar av kt-skipanini eru gjørdar verða ásetingarnar í uppskotinum settar í gildi við kunngerð frá landsstýrismanninum.

Landstýrismaðurin kann áseta skiftiskipanir. Tørvur kann vera á hesum, um tað verður ásett eitt tíðarskeið ímillum at kt-skipanin kemur í rakstur og til upplýsingarnar í skipanini verða alment atkomuligar.

Í hesum uppskotinum verða í § 1, nr. 3 tvær nýggjar greinar, § 15 g og § 15 h, settar inn í vinnufyritøkilógina aftan á § 15 f. Í galdandi vinnufyritøkulóg er eingin § 15 f, men verður § 15 f sett inn í lógina í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (striking av handhavapartabrøvum), sum verður lagt fyri tingið samtundis við hesum uppskotinu. Lógartekniskt er tí neyðugt, at §§ 15 g og 15 h í hesum uppskotinum verða settar í gildi samstundis við § 15 f í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (striking av handhavapartabrøvum)

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 5. mars 2019

**Poul Michelsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummælissvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 3: Ummælissvar frá Tryggingareftirlitinum
Fylgiskjal 4: Ummælissvar frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar
Fylgiskjal 5: Ummælissvar frá Skráseting Føroya
Fylgiskjal 6: Ummælissvar frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 7: Ummælissvar frá Fíggjarmálaráðnum